**FÍGGJARGONGDIN 2016**

**Kunning um fíggjargongdina síðani ársaðalfundin sambært viðtøkunum §3, stk. 13 b og §4, stk. 12 b**

**og**

**RAKSTRAR-, FÍGGJAR- OG ÍLØGUÆTLAN 2017**

**Uppskot til fíggjarætlan fyri komandi rakstrarár til góðkenningar sambært viðtøkunum § 3, stk. 13 c og §4, stk. 12 c og §9, stk. 1 til stk. 4**

## Innihaldsyvirlit

1. Samandráttur ........ 4
1.1 Fíggjargongdin síðan ársaðalfundin og gongdin fyri árið 2016 ........ 4
1.2 Rakstrar-, fíggjar- og íløguætlanin í 2017 ........ 5
2. Á eykaaðalfundinum hjá SEV tann 25. november 2016 skulu hesi mál leggjast fram ........ 6
2.1 Til viðgerðar ........ 6
2.2 Til góðkenningar ........ 6
3. Inngangur ........ 8
3.1 Rentuberandi skuld í mun til EBITDA ........ 8
3.2 Høvuðs- og lyklatøl 2008-2019 ........ 9
4. Fíggjargongdin síðani ársaðalfundin og gongdin fyri árið 2016 ........ 11
4.1 Elsøla og elframleiðsla ........ 12
4.2 Inntøkurnar 2016 ........ 14
4.3 Rakstrarútreiðslurnar ........ 15
4.3.1 Oljukostnaður ........ 15
4.3.2 Tilfar og tænastuveitingar ........ 18
4.3.3 Lønir ........ 18
4.3.4 Avskrivingar ........ 18
4.3.5 Renta og javnan av kapitalpørtum ........ 18
4.4 Íløgur, lántøka og gjaldføri ........ 19
5. Rakstrar-, fíggjar- og íløguætlan 2017 ........ 21
5.0 Váttan frá óheftum grannskoðara ........ 21
5.1 Lønsemið í inntøkunum og áseting av elprísinum ........ 22
5.1.1 Gongdin í arbeiðinum við lønseminum í inntøkunum seinastu árini ........ 22
5.2 Elsølan og elframleiðslan ........ 25
5.3 Vindorkukeyp frá Sp/F Vindrøkt og dótturfeløgum hjá SEV ........ 25
5.4 Samlaðar inntøkur ........ 27
5.5 Rakstrarútreiðslur ........ 27
5.5.1 Prístryggingarstrategi (hedgingstrategi) fyri olju, gjaldoyra og rentu ........ 28
5.5.2 Strategi fyri trygging av oljuprísváða og gjaldoyrisváða ........ 29
5.5.3 Strategi fyri trygging av rentuváða ........ 29
5.5.4 Oljuútreiðslur ........ 29
5.5.5 Tilfar og tænastuveitingar ........ 30
5.5.5.1 Framleiðsluvirksemið ........ 31

5.5.5.2 Netvirksemið ... 31
5.5.5.3 Fyrisiting ... 31
5.5.6 Lønarútreiðslur ... 32
5.5.7 Avskrivingar ... 34
5.5.8 Rentur og javnan av kapitalpørtum ... 35
5.6 Íløgur ... 36
5.7 Lántøka ... 39
5.8 Gjaldførið ... 40
6. Haldførið í fíggjarætlanini 2016-2025 ... 41
7. Lýsing av búskapinum hjá SEV árini 2008-2026 ... 42
8. Sjálvstøðugt partafelag at reka vindmyllulundirnar ... 49
8.1 Neshagi ... 49
8.2 Húsahagi ... 50
9. Rakstrartøl og talvur ... 52

# 1. Samandráttur

Sambært viðtøkum felagsins skal SEV greiða frá fíggjargongdini í 2016 og rakstrar-, fíggjar- og íløguætlanini í 2017. Rakstrar-, fíggjar- og íløguætlanin 2017 er gjørd sum samtaksætlan, har dótturfeløg eru konsolideraði (løgd saman) við móðurfelagnum og innanhýsis handilstiltøk, millumrokningar v.m. eru elimineraðar (tiknar burturúr).

## 1.1. Fíggjargongdin síðani ársaðalfundin og gongdin fyri árið 2016

Felagið væntar eitt avlop av rakstrinum í 2016 upp á 105,8 mió. kr. í mun til ætlanina upp á 72,5 mió. kr. ella eitt meirúrslit upp á 33,3 mió. kr. Ivamál kunnu vera við hesum, men mett verður, at avlopið væntandi ikki verður minni enn 90 mió. kr.

Góða úrslitið stavar millum annað frá meirsølu av kWt, tó at inntøkan av hesum er nakað lægri enn ætlað, lægri oljukostnaði og lægri kostnaði sum heild.

At felagið hevur selt meiri ger, at framleiðslan eisini verður nakað størri enn undanfarna ár. Oljukostnaðurin er lægri enn ætlað serliga grundað á lægri oljuprísir við 30,6 mió.kr. Kostnaðurin til tilfar og tænastuveitingar er eisini minni enn væntað við 12,3 mió. kr., meðan kostnaðurin til lønir er 3,9 mió. kr. lægri. Kostnaðurin til avskrivingar er 2,4 mió. kr. hægri enn ætlað og kostnaðurin til rentur verður 5,9 mió. kr. hægri enn ætlað. Innroknað er stovningarprovisión uppá 8,3 mió. kr. í nettorentukostnaðinum í 2016.

Framleiðslan við varandi orku í 2016 verður framroknað til 54,3% móti 60,1% í 2015 ella ein minking við 5,8% stig. Nú tá battarískipanin í Húsahaga er farin at virka, fæst væntandi meiri burtur úr vindorkuni, og fer tá talið við grønari orku væntandi at hækka. Væntandi verður býtið millum orkukeldurnar 45,7% frá olju, 37,0% frá vatni og 17,3% frá vindi. Ætlað er, at elframleiðslan úr varandi orku skal økjast í framtíðini. Hetta er avbjóðandi, serliga tá samlaða framleiðslan støðugt økist. Somuleiðis ávirkar veðrið eisini varandi partar av elframleiðsluni.

Íløgurnar í 2016 verða framroknaðar til 250,7 mió. kr. móti ætlað 377,4 mió. kr. Henda lægri íløga býtir seg yvir fleiri økir. Ætlað var við eini lántøku upp á 1.000 mió. kr., men tá ið íløgurnar gerast lægri enn ætlað, er ikki neyðugt við allari ætlaðu lántøkuni. Hinvegin verður bruttoskuldin hjá felagnum ætlandi umfíggjað í desember 2016, hetta viðførir eina lántøku uppá 1.000 mió. kr., sjálvt um bruttoskuldin hjá felagnum í løtuni er 830 mió. kr. Meirlántøkan uppá 170 mió. kr. verða at nýta til íløgur komandi tíðina. Roknað verður við einum gjaldføri upp á 343,5 mió. kr. við árslok, sostatt hevur felagið eitt gott gjaldføri. Harumframt hevur felagið ætlandi atgongd til trekningsrættir hjá fíggjarveitarum upp á 670 mió. kr. at nýta til íløgur og gjaldføri komandi tíðina.

Á eykaaðalfundinum 19. juni 2015 var loyvt og heimilað nevndini at avhenda vindmyllulundirnar í Neshaga og í Húsahaga til tvey 100% átt dótturfeløg, har vindmyllu-lundirnar verða fluttar yvir í soleiðis, at raksturin av teimum verður í tveimum sjálvstøðugum feløgum, har SEV er einsamallur eigari. Arbeitt verður við at fyrireika stovnan av nevndu feløgum pr. 1. januar 2016. Feløgini verða ætlandi stovnað við árslok 2016.

Nevnd og leiðsla eru nøgd við gongdina higartil í 2016, framroknaða úrslitið fyri 2016 og við fíggjarstøðu felagsins ultimo 2016.

## 1.2. Rakstrar-, fíggjar- og íløguætlanini í 2017.

Ætlandi fer SEV at lækka elprísin til kundarnar í 2017 við 0,05 kr. pr. kWt. Við hesum væntar felagið eitt avlop av rakstrinum í 2017 upp á 67,5 mió. kr. Neyðugt er hjá felagnum at uppbyggja eina góða búskaparliga støðu, fyri at verða ført fyri at gjøgnumføra ætlaðar íløgur komandi árini. Talan er millum annað um víðkan av Sundsverkinum, vindorkuni, fleiri nýggjar koplingarstøðir, og útbygging av elnetinum har kaðal til Suðuroy er ein partur.

Ætlað økist elsølan við umleið 2,5% og harvið eisini framleiðslan.

Kostnaðurin til tilfar og tænastuveitingar verður ætlaður til 65,1 mió. kr., sum er hægri enn framskrivaði kostnaðurin í 2016, men lægri enn ætlaði kostnaðurin fyri 2016. Kostnaðurin til lønir hækkar við vanligum lønarhækkingum, eins og fleiri fólk væntandi verða sett í starv. Ætlandi gerst kostnaðurin til lønir 67,2 mió. kr., sum er lægri enn framskrivaði kostnaðurin í 2016.

Avskrivingarnar verða ætlaðar til 113,2 mió. kr. móti framskrivað 103,5 mió. kr. í 2016. Orsøkin til hækkandi avskrivingarkostnaðin er íløgurnar, felagið ger. Nettorentukostnaðurin verður ætlaður til 37,1 mió. kr., sum er lægri enn framskrivaði kostnaðurin fyri 2016. Orsøkin til hækking í kostnaðinum er økt lántøka.

Ætlandi verða íløgur fyri 728,1 mió. kr. gjørdar, eins og roknað verður við øktari lántøku upp á 320 mió. kr. frá verandi trekningsrættum. Væntandi verður langfreistaðaskuldin 1.320 mió. kr. við árslok 2017.

Í løtuni verður arbeitt við at fáa langtíðarfígging til felagið, sum eisini fer at fevna um fígging til víðkan av Sundsverkinum. Hetta arbeiðið væntast at verða liðugt í desember mánað 2016. Fáast skulu til vega 1.670 mió. kr. í fígging, harav ein størri partur skal verða langtíðarfígging og ein partur trekningsrættur, sum skal brúkast, so hvørt víðkanin av Sundsverkinum fer fram í tíðarskeiðnum 2016-2019. Nýggja fíggingin upp á 1.670 mió. kr. skal brúkast til at umfíggja núverandi bruttoskuld upp á 830 mió. kr., íløgur komandi árini og gjaldføri.

Roknað verður við einum gjaldføri upp á 124,1 mió. kr. við árslok 2017. Harumframt vil felagið hava atgongd til trekningsrætt uppá 350 mió. kr. Harvið hevur felagið eitt gott gjaldføri.

Nevnd og leiðsla eru nøgd við ætlaða úrslitið fyri 2017 og væntaðu fíggjarstøðu felagsins ultimo 2017.

## 2. Á eykaaðalfundinum hjá SEV tann 25. november 2016 skulu hesi mál leggjast fram:

### 2.1 Til viðgerðar:

- Fíggjargongdin síðani ársaðalfundin og gongdin fyri árið 2016, sbrt. viðtøkunum § 3, stk. 13b og § 4, stk 12 b.

### 2.2 Til góðkenningar:

- Rakstrar- fíggjar- og íløguætlanin 2017 sbrt. viðtøkunum § 3, stk 13 c og § 4, stk. 12 c og §9, stk. 1 til stk. 4 herundir:

    1. At kWt-prísurin fyri allar kundabólkar verður lækkaður við 0,05 kr. pr. kWt, og verður sum vístur í gjaldskránni.
    2. Føstu gjøldini og íbindingargjøldini verða óbroytt, og verða tey sum víst í gjaldskránni.
    3. At samsýningin til nevndarformannin verður 12.612 kr. um mánaðin, næstformannin 9.459 kr. um mánaðin og til einstøku nevndarlimirnar 6.306 kr. Harumframt fyri hvønn fund nevndarlimir luttaka á fyri Elfelagið, at nevndarlimir fáa fundarpening samsvarandi tænastumannasáttmálanum. Kostnaður í sambandi við ferðing v.m. verður endurrindaður nevndarlimum.
    4. At sita nevndarlimir hjá SEV í øðrum nevndum hjá Elfelagnum, eitt nú í øðrum feløgum hjá SEV ella bygginevndum ella líknandi, verður hetta arbeiðið lønt alt eftir, hvussu umfatandi arbeiðið er. Tó er ongin eyka samsýning fyri nevndararbeiði í vindmyllu dótturfeløgunum.
    5. At íløgurnar verða tilsamans 728,1 mió. kr. herundir:

        - At nevnd felagsins sjálv kann gera av, hvussu langtíðarútbyggingin av netinum yvir komandi 4 árini verður skipað, herundir tíðarætlan, raðfesting, útboð o.s. fr. fyri ein samlaðan kostnað uppá 408,2 mió. kr. yvir tíðarskeiðið 2017-2020.
        - At nevnd felagsins, sum ein partur av netútbyggingini uppá 408,2 mió. kr., sjálv kann gera av, hvussu byggingin av nýggjum koplingarstøðum og dagføring av verandi yvir 4 ár verður skipað, herundir tíðarætlan, raðfesting av byggingini, útboð í sambandi við byggingina o.s.fr. fyri ein samlaðan kostnað upp á 252,2 mió. kr. yvir tíðarskeiðið 2017-2020, ella 285,9 mió. kr. tá 2016 eisini er innroknað.
        - At útseta byggingina av nýggja verkstaðar- og fyrisitingarbygningi fyri upp til 80 mió. kr. til 2022, og í staðin fara undir at umvæla og dagføra verandi fyrisitingarbygning yvir tvey ár, harav 18,1 mió. kr. eru ætlaðar í 2017 og 5,9 mió. kr. í 2018.

    6. At SEV í 2017 kann fara undir eina 2 ára royndarætlan fyri sølu av el til elbilar og hitapumpur, har talan er um eina avsláttrarskipan fyri elprísin, og at nevndin í hesum sambandi fær heimild til sjálv at gera av, hvussu henda avsláttrarskipan

skal skipast í øllum lutum, herundir at áseta kWt prísin, fasta gjaldið og íbindingargjaldið og aðrar tilhoyrandir treytir.

## 3. Inngangur

Ætlanin er at gera eina generella prísbroyting í 2017, tað er at lækka kWt prísin við 0,05 kr. pr. kWt. Harumframt er ætlanin av gera eina royndarætlan av sølu til el til elbilar og hitapumpur við eini avsláttrarskipan.

Fyri 2016 verður úrslitið væntandi eitt avlop upp á 105,8 mió. kr., meðan úrslitið fyri 2017 er eitt væntað avlop upp á 67,5 mió. kr. eftir príslækkingina.

Frá 2008-2012 hevði SEV eitt samlað hall upp á tilsamans umleið 100 mió. kr, tá ið hædd var tikin fyri broyting í roknskaparháttinum í 2012. Nevnd og leiðsla settu sær sum mál at venda vánaligu gongdini, og í 2013 gjørdist úrslitið eitt avlop av rakstrinum upp á 11,9 mió. kr. Henda gongd helt fram í 2014 og 2015, har úrslitið gjørdist eitt avlop av rakstrinum upp á ávikavist 57,8 mió. kr. og 103,1 mió. kr.

Yvirskipað sæð hevur felagið sett sær sum mál, at frá 2015 skal úrslitið av rakstrinum lúka kravið um eina nøktandi eginfígging til íløgurnar, sum ætlandi standa fyri framman. SEV hevur brúk fyri, at ætlaðu íløgurnar verða fíggjaðar við eini nøktandi eginfígging saman við fremmanda fígging. Hetta krav kann røkkast við, at SEV hevur eitt nøktandi avlop av rakstrinum, tí hetta verður mett at verða einasti hátturin eginfígging fæst til vega hjá felagnum.

Nevnd og leiðsla felagsins meta, at við framroknaða úrslitinum í 2016 og væntaða úrslitinum í 2017 er kravið lokið um eina nøktandi gongd í rakstrinum og eina nøktandi eginfígging í mun til ætlaðu íløgurnar, um so er at gongdin heldur áfram.

### 3.1 Rentuberandi skuld í mun til EBITDA

Feløg, sum SEV kann samanbera seg við, hava eina skuld í mun til EBITDA[1] í 2015, sum niðanfyri standandi talva vísir.

| DONG | NGF Nature Energy | SEV | Nukissiorfiit | Landsvirkjun | Orkuveita | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1,7x | 6,7x | **2,8x** | 5,5x | 6,2x | 6,4x | 5,8x |

Mett verður, at tað ikki er gott fyri eitt vanligt virki, at skuldin í mun til EBITDA er hægri enn 3 ferðir. Tó er tað vanligt, at hetta talið er hægri.

Av tí at SEV er ein felagsskapur, sum virkar á ein øðrvísi hátt enn eitt vanligt felag, kann kravið upp á 3,0 ferðir virka ov kravmikið. SEV hevur hinvegin sett sær sum langtíðarmál, at skuldin í mun til EBITDA ikki skal verða størri enn 6,0 ferðir.

Hetta støðið klárar felagið at lúka í løtuni, og skuldin í mun til EBITDA í 2016 fer at liggja á 2,6 ferðir. Hetta hækkar til 5,5 ferðir í 2017 og 5,8 ferðir í 2019, har tað er hægst, fyri síðani at falla aftur til 3,5 ferðir í 2026.

[1] Earnings before interests, tax, depreciation and amourtisation. Úrslit áðrenn rentur, skatt og avskrivingar. Keldur: http://www.dongenergy.com/da/investor/finansielle-rapporter/%C3%A5rsrapporter?WT.mc_id=aarsregnskab, https://www.natureenergy.dk/fileadmin/naturgasfyn/Regnskab/NGF_Nature_Energy_Holding_AS__AArsrapport_2015.pdf, https://www.or.is/sites/or.is/files/or_financial_statements_2015.pdf og yvirlit frá SEB.

### 3.2 Høvuðs- og lyklatøl fyri 2008-2019

Fyri at gera eina lýsing av fíggjarligu støðuni hjá SEV er niðanfyri standandi talva við høvuðs- og lyklatølum víst fyri tíðarskeiðið 2008 til 2015, har tølini eru staðfest, og fyri tíðarskeiðið 2016 til 2019 har tølini eru framroknað, ætlað og framskrivað.

Talvan vísir eina støðuga framgongd í nettoumsetninginum, sum stavar frá príshækkingum í tíðarskeiðnum fram til 2014, eins og sølan av kWt hevur verið hækkandi frá 2012.

| mió. kr. | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016F | 2017Æ | 2018F | 2019F |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoumset-ningur | 275 | 277 | 278 | 316 | 356 | 384 | 411 | 422 | 421 | 419 | 426 | 451 |
| EBITDA | 36 | 78 | 15 | 36 | 76 | 104 | 156 | 221 | 248 | 218 | 223 | 226 |
| Ársúrslit | -16 | 15 | -46 | -39 | -12 | 11,9 | 57,8 | 103 | 106 | 68 | 61 | 40 |
| Íløgur | 92 | 80 | 93 | 96 | 148 | 155 | 275 | 232 | 251 | 728 | 251 | 224 |
| Gjaldføri | 24 | 37 | 42 | 57 | 87 | 67 | 132 | 222 | 343 | 124 | 148 | 147 |
| Aktiv tils. | 499 | 1.151 | 1.201 | 1.287 | 1.411 | 1.475 | 1.742 | 1.960 | 2.236 | 2.616 | 2.777 | 2.867 |
| Eginogn | 341 | 967 | 922 | 885 | 870 | 882 | 940 | 1.042 | 1.149 | 1.216 | 1.278 | 1.317 |
| Skuld tils. | 105 | 187 | 293 | 382 | 519 | 575 | 783 | 898 | 1.068 | 1.381 | 1.481 | 1.531 |
| Renting av eginogn | -4,6 | 2,3 | -4,9 | -4,4 | -1,4 | 1,4 | 6,3 | 10,4 | 10,1 | 5,7 | 4,9 | 3,1 |
| EBITDA í mun til skuld | 2,9 | 1,9 | 12,0 | 7,4 | 4,9 | 4,3 | 3,6 | 2,8 | 2,6 | 5,5 | 5,7 | 5,8 |
| Eginognar-partur | 68,3 | 82,5 | 74,8 | 68,6 | 61,7 | 59,8 | 54,0 | 53,2 | 51,4 | 46,5 | 46,0 | 45,9 |
| Ársverk | - | - | 175 | 166 | 157 | 159 | 160 | 161 | 163 | 172 | 172 | 172 |

Niðanfyri standandi talva vísir sølu felagsins av kWt innan ymisku kundabólkarnar hjá felagnum frá 2005 til 2015, har tølini eru staðfest, og 2016-2019 har tølini eru framroknað (Fr), ætlað (Æ) og framskrivað (Fs).

| | Landbúnaður, aling, fiskivinna og ráevnisvinna | Gerð, framleiðsla og byggivirksemi | Handils-, matstovu- og gistihúsvirksemi | Flutningur, postur og fjarskifti | Fígging, trygging og aðrar vinnutænastur | Almennar og privatar tænastur kirkjur og samkomur | Gøtuljós | Sethús, íbúðir, summarhús og neyst | Tils. avroknað |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2005 | 15,8 | 51,1 | 19,1 | 18,7 | 3,8 | 32,0 | 6,1 | 74,9 | **221,6** |
| 2006 | 19,3 | 53,8 | 21,0 | 21,8 | 3,9 | 34,1 | 5,6 | 75,6 | **234,9** |
| 2007 | 22,1 | 54,7 | 21,7 | 23,3 | 4,0 | 35,2 | 6,8 | 77,6 | **245,4** |
| 2008 | 23,1 | 53,8 | 22,9 | 25,1 | 4,2 | 36,2 | 7,0 | 81,5 | **253,9** |
| 2009 | 25,8 | 52,0 | 22,6 | 24,4 | 4,5 | 35,6 | 6,7 | 80,5 | **251,9** |
| 2010 | 25,9 | 48,9 | 22,5 | 28,7 | 4,2 | 36,5 | 6,8 | 81,3 | **255,0** |
| 2011 | 26,4 | 44,5 | 22,4 | 31,8 | 4,2 | 36,8 | 7,3 | 81,4 | **254,8** |
| 2012 | 29,4 | 52,5 | 21,6 | 34,7 | 3,9 | 36,6 | 6,9 | 75,7 | **261,4** |
| 2013 | 29,2 | 69,3 | 22,7 | 25,1 | 4,0 | 37,7 | 7,4 | 78,9 | **274,4** |
| 2014 | 31,1 | 76,1 | 24,7 | 25,7 | 4,0 | 37,3 | 7,0 | 78,0 | **283,8** |
| 2015 | 36,6 | 76,5 | 23,1 | 24,9 | 3,9 | 37,9 | 7,1 | 78,0 | **288,1** |
| 2016Fr | 38,1 | 78,8 | 23,3 | 25,0 | 4,0 | 39,1 | 7,2 | 80,4 | **295,8** |
| 2017Æ | 41,9 | 79,6 | 23,5 | 25,2 | 4,0 | 39,9 | 7,3 | 82,0 | **303,4** |
| 2018Fs | 48,2 | 80,3 | 24,0 | 25,7 | 4,1 | 40,7 | 7,5 | 83,6 | **314,1** |
| 2019Fs | 62,6 | 82,0 | 24,5 | 26,2 | 4,2 | 41,5 | 7,6 | 85,3 | **333,9** |

Sum talvan frammanfyri vísir, er eginognin hjá SEV í 2009 munandi økt orsakað av broyting í avskrivingartíðarskeiðnum av materiellu støðisognini. Peningastreymarnir hava verið smáir árini 2008-2012 í mun til íløgur, tí hevur verið neyðugt við øking av elprísinum og øktari lántøku til rakstur og íløgur.

SEV hækkaði elprísin 0,15 kr. pr. kWt 1. januar 2011, og 1. januar 2012 hækkaði elprísurin 0,10 kr. pr. kWt við góðkenning frá Elveitingareftirlitinum. Samstundis ásannaðu Elveitingar-eftirlitið og SEV, at høgi oljuprísurin og tørvurin at útbyggja og endurnýggja bæði í framleiðsluni og á linjuøkinum bóru við sær, at neyðugt var at hækka prísin aftur 1. januar 2013.

1. januar 2013 hækkaði SEV prísirnar 0,05 kr. pr. kWt fyri allar brúkarar umframt 0,06 kr. pr. kWt fyri brúkarar, sum koma undir serstøku gjaldskránna, og sum hava eina nýtslu størri enn 30.000 kWt (áður 20.000 kWt) - nevndir "ídnaðarkundar". Harumframt fekk SEV góðkenning frá Elveitingareftirlitinum at hækka prísin fyri ídnaðarkundarnar 0,05 kr. pr. kWt pr. 1. januar 2014. Prísurin pr. kWt uttan MVG gerst soleiðis 1,15 kr. fyri hendan kundabólk. Eingin prísbroyting var upp á kWt-prísin í 2015 og 2016. Hinvegin er sum nevnt áður ætlanin, at kWt-prísurin skal lækkast við 0,05 kr. pr. kWt í 2017.

SEV metir høgar oljuprísir at vera rættiliga álvarsamar. Oljuprísurin er lækkaður munandi seinastu tíðina, og er hesin á einum lægri støði í dag enn fyri tveimum árum síðani. Tó er oljuprísurin á veg uppeftir aftur, nú tað hevur eydnast OPEC at finna eina semju um framleiðsluna. SEV ynskir alla tíðina at arbeiða fyri at seta tiltøk í verk, sum minka um oljuútreiðslurnar. Eisini arbeiðir SEV í aðrar mátar áhaldandi við at fáa framleiðslukostnaðin fyri elmegina niður.

Hetta er millum annað gjørt við víðkanini av Eiðisverkinum, vindmyllulundunum í Neshaga og í Húsahaga. Hesi trý tiltøk hava við sær, at oljunýtslan hjá SEV minkar umleið 14.000 tons, og tað fer, tá ið avtornar, at síggjast aftur í einum meiri støðugum búskapi, umframt eini munandi minking í $CO_2$ útlátinum á umleið 30.000 tons árliga.

Hetta eru tí tiltøk, sum hvør einstakur elbrúkari og harvið eisini alt samfelagið fær ágóðan av, bæði hvat spardari olju og umhvørvinum viðvíkur.

Avbjóðingarnar eru stórar við einum so stórum parti av elframleiðsluni burtur úr vindmegi, tí er battarískipanin í Húsahaga sett upp fyri at fáa so stóran part av elframleiðsluni til høldar. Skipanin er royndarkoyrd seinastu mánaðirnar, og formliga bleiv battarískipanin tikin í nýtslu 28. september 2016.

Frá síðu 53 og fram eru vístar ymiskar roknskaparligar uppsetingar, eins og nágreiniligar sundurgreiningar eru gjørdar fyri ymisku økini.

## 4. Fíggjargongdin síðani ársaðalfundin og gongdin fyri árið 2016

Eftir viðtøkunum hjá SEV - §3, stk. 13 b og §4, stk. 12 b - skal nevndin lata eykaðalfundinum á heysti eina frágreiðing um búskapargongdina síðani seinasta ársaðalfund. Umframt gongdina síðani ársaðalfundin er niðanfyri greitt frá væntaðu gongdini fyri alt árið soleiðis, at givið verður eitt framroknað boð upp á úrslitið við árslok 2016.

Niðanfyri eru víst rakstrartøl sambært bókhaldinum fyri tíðarskeiðið januar til september 2016, eins og úrslitið fyri 2016 er framroknað. Víst er eisini á frávik frá ætlanini fyri 2016 og framrokningini.

Bókingarnar eru tíðargreinaðar men ikki grannskoðaðar. Harafturat skal í tølunum fyri inntøkur takast fyrivarni fyri, at ársuppgerð fyri ein minni part av elkundunum ikki er tøk fyrr enn í desember, tá ið avlesturin er liðugur og gjørdur upp. Eisini skal roknast við møguligum eftirbókingum.

Talvan niðanfyri vísir staðfest rakstrartøl fyri 2011-2015 og staðfest og framroknað tøl fyri 2016 í mió. kr.

| | Rokn-skapur 2011 | Rokn-skapur 2012 | Rokn-skapur 2013 | Rokn-skapur 2014 | Rokn-skapur 2015 | Samtaks-ætlan 2016 | Uppgjørt pr. 30. sept 2016 | Fram-roknað 2016 | Frávik Ætlan og fram-roknað |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoumsetningur | 316,4 | 355,8 | 384,6 | 410,6 | 422,0 | 425,2 | 300,3 | 421,1 | -4,1 |
| Oljuútreiðslur | 142,6 | 166,0 | 167,9 | 141,5 | 86,2 | 77,7 | 37,3 | 48,1 | 29,6 |
| Tilfar og tænastur | 74,9 | 53,5 | 54,1 | 49,8 | 49,9 | 68,8 | 38,6 | 56,5 | 12,3 |
| Lønir | 62,6 | 60,2 | 58,7 | 63,6 | 64,3 | 72,4 | 49,9 | 68,5 | 3,9 |
| Útreiðslur tils. | 280,1 | 279,7 | 280,7 | 254,9 | 200,5 | 218,9 | 125,8 | 173,1 | 45,8 |
| **Úrslit áðrenn av- og niðurskrivingar** | **36,3** | **76,0** | **103,9** | **155,6** | **221,5** | **206,3** | **174,5** | **248,0** | **41,7** |
| Avskrivingar | 61,1 | 67,8 | 70,0 | 77,2 | 93,6 | 101,1 | 75,7 | 103,5 | -2,4 |
| **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | **-24,8** | **8,3** | **33,9** | **78,4** | **127,9** | **105,2** | **98,8** | **144,5** | **39,3** |
| Rentuútreiðslur netto og virðisjavnan | 14,5 | 20,5 | 22,0 | 20,6 | 25,3 | 32,8 | 21,6 | 38,7 | -5,9 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **-39,3** | **-12,3** | **11,9** | **57,8** | **103,1** | **72,5** | **77,2** | **105,8** | **33,3** |

Ársúrslitið fyri 2016 verður framroknað til eitt avlop av rakstrinum upp á 105,8 mió. kr. Tá ið talan er um framroknað tøl, er natúrliga ivi knýttur at tølunum, men væntandi verður úrslitið ikki minni enn eitt avlop upp á 90 mió. kr. Felagið ætlaði upprunaliga við einum úrsliti í 2016 upp á 72,5 mió. kr., soleiðis hevur felagið munandi størri framgongd enn upprunaliga ætlað. Ein av orsøkunum til hetta er fallandi oljuprísurin og minni nýtsla av tilfari og tænastum.

Framroknað verður við 421,1 mió. kr. í nettoumsetningi, sum er 4,1 mió. kr. minni enn ætlað. 1,5 mió. kr. stava frá lægri kWt sølu, meðan 4,2 mió. kr. stava frá lægri íbindingargjøldum enn væntað. Aðrar inntøkur er 1,6 mió. kr. hægri enn ætlað.

Góða veðrið í vár og summar hevur ávirkað varandi partin av elframleiðsluni soleiðis, at hon er minni enn undanfarna ár, tá ið veðrið rættiliga var SEV til vildar. Oljuútreiðslurnar íroknað gassolju og smyrjiolju eru 30,5 mió. kr. lægri enn ætlað, og høvuðsorsøkin er fallandi oljuprísurin, men SEV fer væntandi at brúka 2.456 tons meiri í tungolju enn ætlað, sum mótvirkar hinvegin.

Tungoljukeypið fyri 2016 er prístryggjað, eins og felagið hevur keypt dollar upp á termin til rindan fyri oljuna. Ætlanin við hesum er so vítt gjørligt at kunna halda fíggjarætlanini viðvíkjandi oljukostnaðinum, men grundað á fallandi oljuprísin síðani fíggjarætlanin bleiv gjørd, er prístryggingin gjørd á einum væl lægri prísi enn upprunaliga ætlað.

Tilfar og tænastuveitingar verða framroknaðar til at verða 56,5 mió. kr., sum er 12,3 mió. kr. minni enn ætlað, og lønir verða framroknaðar til 68,5 mió. kr., sum er 3,9 mió. kr. lægri.

Avskrivingarnar eru framroknaðar til 103,5 mió. kr., sum er 2,4 mió. kr. hægri enn ætlað, og rentukostnaðurin er 38,7 mió. kr., sum er 5,9 mió. kr. hægri enn ætlað. At rentukostnaðurin er hægri enn ætlað, er tí, at skuldin er umfíggjað í árinum, og stovningarprovisión er bókað undir rentukostnaðinum.

## 4.1 Elsøla og elframleiðsla

Náttúran broytist ár um ár og við henni eisini framleiðslan úr vatni og vindi, sum verður ávirkað bæði upp og niður. Elframleiðslan higartil kann sundurgreinast í GWt, sum talvan niðanfyri vísir. Meiri av regni og vindi enn vanligt var fram til juli mánað í 2015, meðan ein partur av august og september var lakari enn vanligt, um samanborið verður við 2016.

| | jan-sept. 2016 | í % | jan-sept. 2015 | Broyting í % | okt. 2015 til sept. 2016 | í % | okt. 2014 til sept. 2015 | Broyting í % |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vindur | 35,5 | 15,5 | 39,1 | -9,1 | 52,2 | 16,4 | 56,4 | -7,4 |
| Vatn/hydro | 71,8 | 31,3 | 85,5 | -16,0 | 119,4 | 37,6 | 126,4 | -5,5 |
| Termisk | 122,3 | 53,2 | 101,5 | 20,5 | 146,3 | 46,0 | 128,3 | 14,0 |
| Tilsamans | 229,6 | 100,0 | 226,1 | 1,6 | 318,0 | 100,0 | 311,1 | 2,2 |

Verður hugt at tølunum fyri tíðarskeiðið oktober 2015 til september 2016 í mun til undanfarna tíðarskeið sæst, at framleiðslan er økt 2,2%. Higartil í 2016 er framleiðslan økt 1,6%.




Sum frammanfyri standandi talva vísir, er elframleiðslan úr vindi og vatni minni enn undanfarna tíðarskeið, og kemur hetta serliga av, at tað ikki hevur regnað eins nógv fyrstu mánaðirnar í 2016 sum í 2015. Sama er galdandi fyri elframleiðsluna burturúr vindi. Veðrið

hevur samanumtikið verið sera gott í vár og summar. Av hesi orsøk er elframleiðslan úr termiskari orku økt.

Talvan niðanfyri vísir gongdina í avroknaðari sølu til kundar felagsins, nettap og eginnýtslu og framleiðsluna í GWt seinastu 7 árini. Harumframt framganga ætlaðu og framroknaðu tølini fyri 2016.

| Avroknað søla í GWt. | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | Samtaks-ætlan 2016 | Fram-roknað 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Avroknað søla til kundar í GWt | 251,9 | 255,0 | 254,8 | 261,4 | 274,4 | 283,8 | 288,1 | 296,6 | 295,8 |
| Nettap og eginnýtsla í GWt | 23,6 | 25,3 | 19,0 | 30,1 | 18,1 | 21,6 | 26,3 | 21,6 | 23,4 |
| Framleiðsla tilsamans í GWt pr. Ár | 275,5 | 280,3 | 273,8 | 291,6 | 292,5 | 305,4 | 314,4 | 318,2 | 319,2 |
| Harav við termiskari | 168,1 | 199,3 | 166,8 | 181,0 | 180,1 | 150,2 | 125,5 | 139,3 | 146,0 |
| Harav við vatni | 92,4 | 67,4 | 92,5 | 99,8 | 90,6 | 120,7 | 133,1 | 122,0 | 118,0 |
| Harav við vindi | 15,0 | 13,6 | 14,5 | 10,8 | 21,8 | 34,5 | 55,8 | 56,9 | 55,3 |
| Grønur partur | 107,4 | 81,0 | 107,0 | 110,6 | 112,4 | 155,2 | 188,9 | 178,9 | 173,3 |
| Vøkstur í elnýtslu í % | | 1,2 | 0,0 | 2,6 | 5,0 | 3,4 | 1,5 | 1,7 | 1,6 |

Í 2016 var ætlað við eini elframleiðslu á 318,2 GWt. Hendan er framroknað at verða 319,2 GWt ella 1,0 GWt meiri. Ætlað varð við eini elframleiðslu úr varandi orkukeldum á 178,9 GWt (56,2% grønur partur), men hendan framleiðslan er framroknað til 173,3 GWt ella 5,6 GWt minni. Termisku verkini skuldu væntandi framleiða 139,3 GWt, men tey eru framroknað til at framleiða 146,0 GWt ella 6,7 GWt meiri.

Hetta viðførir, at elorka framleidd við grønari orku verður framroknað til 54,3%, meðan termiska orkan verður framroknað til 45,7%. Harvið er SEV minni grønari enn í 2015, tá ið framleitt var 60,1% við grønari orku.

## 4.2 Inntøkurnar 2016

Tríggir faktorar ávirka høvuðsinntøkuna hjá SEV. Hesir tríggir faktorar eru elprísbroytingar, broytingar í elnýtsluni og forskjótingar í millum ymiskar kundaprísbólkar. Niðanfyri standandi talva vísir nettoumsetning felagsins sundurgreinaðan seinastu árini í mió. kr., eins og framroknaða talið fyri 2016 framgongur.

| Nettoumsetningur í mió. kr. | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | Samtaks-ætlan 2016 | Fram-roknað 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| KWt gjald | 260,3 | 261,8 | 296,5 | 335,0 | 362,4 | 379,2 | 385,0 | 397,1 | 395,6 |
| Fast gjald | 16,4 | 16,1 | 16,5 | 16,4 | 16,6 | 16,5 | 16,4 | 16,7 | 16,7 |
| Íbinding | 2,1 | 1,6 | 1,3 | 2,3 | 6,9 | 14,7 | 16,2 | 12,7 | 8,6 |
| Ómaksgjald v.m. | 1,1 | 1,3 | 5,0 | 4,7 | 1,3 | 2,7 | 6,7 | 1,4 | 3,0 |
| **Inntøkur** | **279,9** | **280,8** | **319,3** | **358,4** | **387,2** | **413,1** | **424,4** | **428,0** | **423,8** |
| Keyp av vindorku | -2,7 | -2,6 | -2,8 | -2,5 | -2,6 | -2,5 | -2,4 | -2,7 | -2,7 |
| **Nettoumsetningur** | **277,2** | **278,3** | **316,4** | **355,8** | **384,6** | **410,6** | **422,0** | **425,3** | **421,1** |

Sum frammanfyri standandi talva vísir, eru inntøkur felagsins hækkaðar støðugt frá 2009 fram til 2015. Hetta kemur ikki einans av, at avroknað kWt nýtsla hjá kundunum er vaksin, men eisini tí at prísurin er hækkaður í fleiri umførum seinastu árini fyri serliga at mótvirka hækkandi oljukostnaðinum hjá felagnum, sum verður brúktur í framleiðsluni.

Trupult er at gera metingina meiri nágreiniliga, tí inntøkuvøksturin er eisini treytaður av, hvørjum kundabólki vøksturin kemur frá. Ymiskt er, hvussu vøksturin verður býttur millum kundarnar. Einstakir kundabólkar hava framgongd serliga alivinnan, fiskivinnnan og framleiðslan eins og privatkundar.

SEV er enn ikkiført fyri nágreiniliga at siga um gongdina í kundabólkunum, fyrr enn endalig avrokning fyriliggur við ársenda. Tá ið nýggju fjarskiftismálararnir allir verða tiknir í nýtslu, verður hesin trupulleiki loystur, og enn vænta umleið 5.000 málarar (av 25.000 stk.) at verða innroknaðir í nýggju skipanina hjá SEV.

Ein minni partur av søluni verður gjørdur upp við avlestri hjá kundum eina ferð um árið, og tá verður staðfest, hvat endaliga sølan til einstaka kundan hevur verið. Avlisið verður í høvuðsheitum í desember á hvørjum ári. Eisini skal hædd takast fyri eginnýtslu hjá SEV og nettapi. Roknað er við 23,4 GWt í nettapi í 2016. Seinastu 5 árini hevur nettapið verið 23 GWt í miðal, men talið hevur verið svingandi ár fyri ár.

Uppgjørda inntøkan frá sølu av kWt upp á 282,0 mió. kr. fram til 30. september 2016 kann ikki beinleiðis umroknast til eina fulla ársinntøku, tí at ein minni partur av bókaðu inntøkunum er grundaður á ákontorokningar, sum verða endaliga uppgjørdar við avlestri við árslok. Harumframt kunnu ávísir skeivleikar verða í tíðargreiningum av ákontogjøldum og inntøkum annars, sum ikki broytast javnt mánað fyri mánað.

Við støði í framgongdini í elframleiðsluni og meting av elnýtsluni, uppgerðum higartil og bókaðum íbindargjøldum verður mett, at inntøkurnar fara at verða 423,8 mió. kr., sum er 4,2

mió. kr. lægri sammett við ætlanina fyri 2016. Nettoumsetningurin í 2016 gerst 421,1 mió. kr. í mun til ætlað 425,3 mió. kr. Ábendingin byggir á avlestur av fjarskiftismálarum hjá kundum og skrásetingina av framleiðslutølunum hjá SEV.

## 4.3 Rakstrarútreiðslurnar

Rakstrarútreiðslurnar hjá felagnum eru oljukostnaður, tilfar og tænastuveitingar, lønir, av-skrivingar og renta. Niðanfyri eru hesir kostnaðir nærri lýstir.

### 4.3.1 Oljukostnaður

SEV hevur prístryggjað oljukeypið í 2016 samsvarandi síni prístryggingarstrategi. Harumframt hevur felagið keypt dollar upp á termin fyri at leggja upp fyri kursváðanum í dollaranum, sum oljukeyp vanliga verða avroknað við. SEV hevur í hesum sambandi ført fram, at tað hevur týdning at kunna halda løgdu rakstrar-, fíggjar- og íløguætlanir, eins og prístryggingin hevur týdning í sambandi við lántøku. Sí nærri lýsing í brot 5.5.1.

SEV hevur á henda hátt roynt at vart seg ímóti møguligum sveiggjum í oljuprísinum og dollarkursinum fyri innkeypi av olju. Hinvegin kann felagið ikki verja seg fyri sveiggjum í oljunýtsluni. Tað hevur stóran týdning at avmarka sveiggið í hesum útreiðslunum, tí hesar útreiðslurnar umfata stóran part av samlaða kostnaðinum hjá felagnum.

Hesin kostnaður er beinleiðis tengdur at prísbroytingum á heimsmarknaðinum umframt elnýtslubroytingini og sveiggjunum í framleiðsluni av elmegi úr vindi og vatni. Oljuprísirnir, sum SEV skal gjalda, eru knýttir at prísnoteringini á oljumarknaðinum og USD-kursinum. Hinvegin kann oljuprísurin á marknaðinum, tá ið oljan verður keypt, verða bæði hægri ella lægri enn fastlæsti prísurin. Hetta merkir, at SEV antin móttekur pening frá tryggingarveitaranum ella má rinda pening til tryggingarveitaran í mun til prísin á marknaðinum ávísu tíðina, tá ið olja verður keypt. Sama er galdandi fyri keyp av dollarum upp á termin. Vanliga verður sagt, at tá ið prísurin upp á oljuna fer upp, fer kostnaðurin av dollarinum niður og øvugt.

Árið 2014 byrjaði við, at oljuprísurin fall til 584 dollar pr. tons fyri síðani at hækka aftur til 630 dollar pr. tons tungolju í mars 2014. Væntað varð, at prísurin fór at fella fyrru helvt av árinum, men hetta vísti seg ikki soleiðis, og í staðin fyri hækkaði prísurin aftur í juni til 633,7 dollar pr. tons tungolju. SEV prístryggjaði oljukeypið fyri 2014 í desember 2013 (veiting januar 2014) og í juni 2014.

Prísurin var verandi høgur, men komin út í juli byrjaði prísurin at fella, til hesin í september 2014 var 553,70 dollar pr. tons tungolju. Við endan av árinum 2014 var hesin 321,1 dollar pr. tons tungolju.

Gongdin í prístryggingini fyri innkeypi av olju í 2014 pr. tons tungolju í krónum hevur verið hendan:

| | kr. pr. tons tungolju | Munur |
|---|---|---|
| Ætlaður prísur í fíggjarætlanini pr. oktober 2013 fyri keyp av olju í 2014 | 3.647 | |
| Fastlagdur oljuprísur við prístrygging pr. desember 2013 og juni 2014 | 3.659 | -12,0 |
| Útroknaður marknaðarprísur 2014 fyri keyp av olju | 3.505 | -154,0 |

Árið 2015 byrjaði við, at oljuprísurin fall til 244,1 dollar pr. tons fyri síðani at hækka aftur til 296,6 dollar pr. tons tungolju í mars 2015. Prísurin helt á fram at hækka fram til mai 2015, har hesin gjørdist 339,8 dollar pr. tons tungolju. Hesin er síðani fallin til 214,8 dollar pr. tons tungolju pr. ultimo september 2015. Síðani fall oljuprísurin til 210 dollar pr. tons tungolju primo oktober 2015. Við endan av árinum 2015 var hesin 154 dollar pr. tons tungolju.

Gongdin í prístryggingini fyri innkeypi av olju í 2015 pr. tons tungolju í krónum hevur verið hendan:

| | kr. pr. tons tungolju | Munur |
|---|---|---|
| Ætlaður prísur í fíggjarætlanini pr. oktober 2014 fyri keyp av olju í 2015 | 3.504 | |
| Fastlagdur oljuprísur við prístrygging pr. juni 2014 og feb. 2015 fyri keyp av olju | 2.639 | -865,0 |
| Útroknaður marknaðarprísur 2015 fyri keyp av olju | 2.125 | -514,0 |

Árið 2016 byrjaði við, at oljuprísurin fall til 122,9 dollar pr. tons fyri síðani at hækka aftur til 158,0 dollar pr. tons tungolju í mars 2016. Prísurin er hildin á fram at hækka fram til september 2016, tá hesin var 251,5 dollar pr. tons tungolju. Oljufelagsskapurin OPEC hevur gjørt semju um at skerja framleiðsluna av olju, og hevur hetta viðført hækkandi oljuprísir.

Oljukeypið fyri 2016 er prístryggjað, og dollarar eru keyptir upp á termin. Hetta var gjørt í januar 2016 og dagført í juni 2016. Prístryggingin í januar 2016 er gjørd væl undir ætlaða oljukostnaðin í fíggjarætlanini fyri 2016. At fastlæsa kostnaðin lægri enn ætlað í fíggjarætlanini ger, at væntaða úrslitið í mun til fíggjarætlanina verður betur við umleið 30,5 mió. kr.

Gongdin í prístryggingini fyri innkeypi av olju í 2016 pr. tons tungolju í krónum hevur verið hendan:

| | kr. pr. tons tungolju | Munur |
|---|---|---|
| Ætlaður prísur í fíggjarætlanini pr. oktober 2015 fyri keyp av olju í 2016 | 2.265 | |
| Fastlagdur oljuprísur við prístrygging pr. januar 2016 fyri keyp av olju | 1.290 | -975 |
| Útroknaður marknaðarprísur 2016 fyri keyp av olju | 1.416 | +126 |

Talvurnar herundir og á næstu síðu vísa gongdina í oljuprísinum og dollarkursinum seinastu nógvu árini. Fyrra talvan vísir kostnaðin pr. tons tungolju í dollar og seinra talvan gongdina í dollarkursinum síðani 2004 og fram til dagin í dag.







Í 2016 er upprunaliga ætlað við einum prísi á 2.548 kr. pr. tons olju – íroknað smyrji- og gassolju. Um bert verður hugt eftir kostnaðinum fyri tungolju, er hesin upprunaliga ætlaður í 2016 til 2.265 kr. pr. tons tungolju.

Prísurin fyri tonsið av tungolju – her uttan smyrji- og gassolju – sum er brúkt í framleiðsluni, er framroknaður í 2016 at verða 1.416 kr., ella 1.132 kr. lægri enn ætlað pr. tonsið. Termisku verkini skuldu væntandi brúka 28.969 tons av tungolju, men framroknað fyri 2016 fara verkini at brúka 31.425 tons. Tað eru 2.456 tons meiri enn ætlað. Hetta gevur ein meir kostnað á 3,5 mió. kr.

Av gassolju skuldu termisku verkini væntandi brúka 840 tons, og framroknað fyri 2016 fara verkini at brúka umleið ætlaðu 840 tons. Fyri smyrjioljuna er galdandi, at verkini væntandi fóru at brúka 240 tons, og framroknað fyri 2016 fara verkini at brúka ætlaðu 240 tons. Nýtslan fyri gassolju og smyrjuolju er soleiðis sum ætlað.

Samlaði oljukostnaðurin íroknað smyrjiolju og gassolju netto í 2016 verður framroknaður til 48,0 mió. kr. í mun til ætlað 78,6 mió. kr. – svarandi til ein minni kostnað á 30,5 mió. kr.

#### 4.3.2 Tilfar og tænastuveitingar

Samlaði kostnaðurin fyri tilfar og tænastuveitingar var ætlaður til 68,8 mió. kr., men framroknað verður hesin kostnaður 56,5 mió. kr. ella 12,3 mió. kr. minni. Hendan minni nýtslan kann sundurgreinast soleiðis, at framleiðsluvirkini hava brúkt 4,6 mió. kr. minni, netvirksemið 3,8 mió. kr. minni, og fyrisitingin hevur brúkt 3,9 mió. kr. minni enn ætlað.

Framhaldandi er fokus á stýringina av nýtsluni av tilfeinginum hjá felagnum, har allir partar hava vanda sær um nýtslu av peningi til ymisku endamálini. Eisini eru arbeiði, sum verða umskipað ella útsett til 2017. Harumframt eru broytingar eisini framdar í verkætlanum.

Alt hetta stuðlar undir at røkka málinum um eitt nøktandi úrslit fyri 2016.

#### 4.3.3 Lønir

Samlaði kostnaðurin fyri lønir var ætlaður til 72,4 mió. kr., men framroknað verður kostnaðurin 68,5 mió. kr. – svarandi til eina lægri útreiðslu upp á 3,9 mió. kr. Hendan lægri nýtslan kann sundurgreinast soleiðis, at framleiðsluvirkini hava eina meirnýtslu á 2,4 mió. kr., netvirksemið brúkar 7,9 mió. kr. minni og fyrisitingin brúkar 1,6 mió. kr. meiri.

Lægri lønarkostnaðurin í netvirkseminum kemur serliga av, at í fíggjarætlanini er ikki roknað við lønarkostnaði sum skal innroknast íløgur fyri arbeiði, sum fólkið hjá SEV ger á íløgusíðuni. Harumframt er ætlaði starvsfólkavøksturin innan hendan partin ikki framdur fyrst í 2016 men umleið mitt í árinum. Lønarkostnaðurin hjá fyrisitingini er 1,6 mió. kr. hægri enn ætlað, tá hædd verður tikin fyri eini javning í eftirlønum til tænastumannaeftirlønir upp á 2,0 mió. kr. í meirkostnaði. Verður sæð burtur frá hesi javning, er lønarkostnaðurin 0,4 mió. kr. lægri enn ætlað.

#### 4.3.4 Avskrivingar

Avskrivingarnar av anleggum eru ætlaðar til 101,1 mió. kr., men hesar eru framroknaðar til 103,5 mió. kr. ella 2,4 mió. kr. hægri enn ætlað. Avskrivingarnar taka støði í verandi ognum eins og til- og frágongd av ognum í 2016.

Orsøkin til hægri avskrivingar enn ætlað í 2016 kemst av, at fleiri arbeiði eru flutt frá arbeiði í gerð til avskrivingargrundarlagið. Íløgurnar fyri 2016 eru 250,7 mió. kr., sum eru 126,7 mió. kr. minni enn upprunaliga ætlað upp á 377,4 mió. kr.

#### 4.3.5 Renta og javnan av kapitalpørtum

Ætlað var við einum nettorentukostnaði og javning av kapitalpørtum á tilsamans 32,8 mió. kr. Framroknað verða hesar 38,7 mió. kr. svarandi til ein meirkostnað á 5,9 mió. kr., sjálvt um samlaða lántøkan hjá felagnum í 2016 ikki er eins stór og ætlað, eins og at lántøkan hjá felagnum ikki er gjørd eins skjótt og ætlað vegna gott gjaldføri.

Orsøkin til meirkostnaðin er, at stovningarprovisión fyri nýggju lántøkuna uppá 8,3 mió. kr.er bókað á rentukostnaðin v.m., og hesum var ikki lagt upp fyri í ætlanini.

SEV

## 4.4 Íløgur, lántøka og gjaldføri

Sambært fíggjarætlanini fyri 2016 var roknað við íløgum fyri tilsamans 377,4 mió. kr. Nú árið er farið at halla, kann staðfestast, at íløgurnar í árinum verða framroknaðar til 250,7 mió. kr., sum eru 126,7 mió. kr. minni enn ætlað, og tær býta seg yvir fleiri øki. Nevnast kann eisini, at umraðfest er innan øki og deildir innanfyri verandi karmar.

Niðanfyri standandi talva vísir íløgurnar sundurgreinaðar í framleiðslu, netvirksemi og fyrisiting.

| Íløgur í mió. kr. | 2016F | 2016Æ | Frávik |
|---|---|---|---|
| | mió. kr. | mió. kr. | mió. kr. |
| Fossáverkið | 0,6 | 2,3 | 1,7 |
| Heygarverkið | 0,2 | 0,4 | 0,2 |
| Mýruverkið | 3,4 | 2,7 | -0,7 |
| Eiðisverkið | 1,6 | 1,8 | 0,2 |
| Verkið í Botni | 0,5 | 2,0 | -0,3 |
| Vágsverkið | 34,1 | 18,2 | -15,9 |
| Verkið í Trongisvági | 1,2 | 3,7 | 2,5 |
| Sundsverkið | 104,1 | 142,8 | 38,7 |
| Strond | 3,6 | 4,6 | 1,0 |
| Smærri verk | 4,5 | 5,5 | 0,7 |
| Vindmyllur v.m. | 0,0 | 0,5 | 0,5 |
| **Framleiðsluvirksemið íløgur tilsamans** | **153,8** | **184,3** | **30,5** |
| Net, koplingarstøðir, bygningar v.m. | 87,6 | 159,6 | 72,0 |
| Fyrisiting við bygningum | 9,4 | 33,5 | 24,1 |
| **Netvirksemið íløgur tilsamans** | **97,0** | **193,1** | **96,1** |
| **Ætlaðar íløgur tilsamans** | **250,7** | **377,4** | **126,7** |

Íløgan í Vágsverkið fyri 2016 er 15,9 mió. kr. hægri enn ætlað grundað á øðrvísi periodiseringar yvir árini av íløguni. Meðan roknað varð við, at íløgan í 2015 gjørdist 81,7 mió. kr. uppá hetta projektið, gjørdist hon 67,3 mió. kr. orsakað av seinkingum í arbeiðinum, tí er framroknaða íløgan fyri 2016 hægri enn ætlað. Tilsamans er íløgan upp á M4 á Vágsverkinum upp á umleið 100 mió. kr. Verkið bleiv formliga tikið í nýtslu 1. september 2016 nakrar mánaðir seinkað í mun til upprunaætlanina.

Fyri Sundsverkið er talan um munandi lægri íløgu upp á 38,7 mió. kr. enn ætlað, serliga er tað lægri íløgan í Støð 3 við 13 mió. kr. og dagtangahúsið við 31,6 mió. kr.

Fyri net og koplingarstøðir er talan um eina lægri nettoíløgu upp á 72,0 mió. kr. Arbeiðið fyri 50,4 mió. kr. upp á koplingarstøðir er útsett til 2017 og 2018. Býtisvirkir hava eina lægri íløgu upp á 0,6 mió. kr. Rakstrardeildin hevði minni íløgur upp á 18,1 mió. kr., og íløgan í Schneider stýrisskipanina upp á 9 mió. kr. er útsett til 2017, eins og íløgur upp á 2,0 mió. kr. ikki vóru gjørdar í 60 kV flutningskervið.

Fyrisitingin hevur væntandi eina lægri íløgu upp á 24,1 mió. kr. stavandi frá, at nýbyggingin av fyrisitingarbygninginum fyri 10 mió. kr. í 2016 fyrst kemur ígongd í 2022, og buffarin hjá leiðsluni til íløgur upp á 10 mió. kr. ikki er brúktur. Harafturat koma smærri ætlaðar íløgur, sum ikki verða framdar ella útsettar.

Felagið fekk í juni mánað 2015 eina samlaða fígging uppá 1.100 mió. kr. til vega, av hesi upphædd hevur felagið brúkt 830 mió. kr. Arbeitt hevur verið við fígging felagsins í sambandi við umskipan av verandi skuld og nýggja skuld til íløgur og gjaldføri. Í ætlanini fyri 2016 er ætlað við eini øktari lántøku upp á 170 mió. kr. umframt umskipan av verandi skuld felagsins upp á 830 mió. kr. Harumframt 670 mió. kr. í trekningsrætti ella tilsamans 1.670 mió. kr.

Henda upphædd skal ætlandi fáast til vega á Amerikanska Private Placement marknaðinum við 1.000 mió. kr. og bankafígging á føroyska og danska marknaðinum við 670 mió. kr. Í skrivandi løtu er SEV um at fara út á amerikanska marknaðin eftir fíggingini umframt, at SEV hevur fingið tilsøgn frá føroyskum og útlendskum peningastovnum uppá 670 mió. kr. í bankafígging. Væntað verður, at samlaða fíggingin til SEV uppá 1.670 mió. kr. verður fingin til vega og avgreidd í desember 2016.

Grundað á, at SEV ikki fremur allar ætlaðar íløgur, er ikki neyðugt at økja lántøkuna í 2016, sum ætlað, men SEV fer at fáa 1.000 mió. kr. til umfígging av 830 mió. kr. frá amerikanska marknaðinum. Tær 170 mió. kr. sum leypa av, skulu brúkast til íløgur komandi árið serliga til Sundsverkið. Bruttoskuldin við árslok 2016 verður væntandi 1.000 mió. kr., og felagið hevur atgongd til trekningsrætt í bankum við upp til 670 mió. kr at brúka til íløgur og gjaldføri.

Roknað verður við, at gjaldførið við ársenda er 343,5 mió. kr. soleiðis, at tøkur peningur íroknað kassakredittir/trekningsrættir upp á 670 mió. kr. ella tilsamans 1.013,5 mió. kr. til íløgur og gjaldføri komandi árini.

## 5. Rakstrar-, fíggjar- og íløguætlanini í 2017

### 5.0 Váttan frá óheftum grannskoðara

**Til kapitaleigararnar í Elfelagnum SEV**

Eftir avtalu hava vit gjøgnumgingið búskaparætlanirnar hjá Elfelagnum SEV fyri tíðarskeiðið 01. januar til 31. desember 2017 sum umfatar rakstrar-, gjaldføris- og fíggjarstøðuætlan umframt fyritreytir fyri ætlanunum og aðrar upplýsingar. Búskaparætlanin er kapittul 5 í hesum skjali.

Leiðsla felagsins hevur ábyrgdina av búskaparætlanunum og teimum fyriteytum, sum ætlanirnar hvíla á, sum standa á síðu 21-40. Okkara ábyrgd er við støði í gjøgnumgongdini at gera eina niðurstøðu um ætlanirnar.

**Gjøgnumgongdin**

Vit hava gjøgnumgingið búskaparætlanirnar samsvarandi altjóða standardinum um, hvussu framtíðar fíggjarligar upplýsingar skulu gjøgnumgangast og annars eftir ásetingunum í føroysku grannskoðaralógini. Hetta krevur, at vit fyriskipa og gjøgnumganga við tí fyri eyga at fáa eina avmarkaða vissu fyri, at grundgivið er væl og virðiliga fyri teimum nýttu fyritreytunum, og at tað ikki eru týðandi skeivleikar í upplýsingunum, og at vit fáa høga vissu fyri, at ætlanirnar eru settar upp eftir teimum uppsettu fyritreytunum.

Vit hava gjøgnumgingið búskaparætlanirnar við tí fyri eyga at kanna um fyritreytirnar, ið leiðslan hevur sett upp, eru skjalfestar, væl grundaðar og fullfíggjaðar. Vit hava kannað, um búskaparætlanirnar eru uppsettar í samsvari við teimum uppsettu fyritreytunum, og um uppsettu tølini hanga rætt saman.

Tað er okkara fatan, at gjøgnumgongdin gevur eitt nøktandi grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Niðurstøða**

Við at gjøgnumganga tey prógv, ið fyritreytirnar eru settar upp eftir, eru vit ikki vorðin varug við viðurskiftir, ið kunnu føra til ta fatan, at fyritreytirnar ikki eru haldgott grundarlag at seta búskaparætlanirnar upp eftir. Harafturat er tað okkara niðurstøða, at tær uppsettu fyri-treytirnar eru grundarlag undir búskaparætlanunum, sum eru settar upp samsvarandi ársroknskaparlógini.

Tað er sannlíkt, at staðfestu úrslitini fara at víkja frá búskaparætlanunum, tí at væntaðar hendingar ofta ikki henda, eins og ætlað er. Munirnir kunnu verða týðandi.

Tórshavn, tann 4. november 2016.

**P/F Januar**
løggilt grannskoðanarvirki

Hans Laksá, Statsaut. revisor

Niðanfyri verður greitt frá, hvørji viðurskifti inntøkumetingarnar í ætlanina fyri 2017 byggja á.

## 5.1 Lønsemið í inntøkunum og áseting av elprísinum

| | Rokn-skapur 2011 | Rokn-skapur 2012 | Rokn-skapur 2013 | Rokn-skapur 2014 | Rokn-skapur 2015 | Fram-roknað 2016 | Ætlan 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoumsetningur | 316,4 | 355,8 | 384,6 | 410,6 | 422,0 | 421,1 | 419,2 |
| Oljuútreiðslur | 142,6 | 166,0 | 167,9 | 141,5 | 86,2 | 48,1 | 69,0 |
| Tilfar og tænastur | 74,9 | 53,5 | 54,1 | 49,8 | 49,9 | 56,5 | 65,1 |
| Lønir | 62,6 | 60,2 | 58,7 | 63,6 | 64,3 | 68,5 | 67,2 |
| Útreiðslur tils. | 280,1 | 279,7 | 280,7 | 254,9 | 200,5 | 173,1 | |
| **Úrslit áðrenn av- og niðurskrivingar** | **36,3** | **76,0** | **103,9** | **155,6** | **221,5** | **248,0** | **217,9** |
| Avskrivingar | 61,1 | 67,8 | 70,0 | 77,2 | 93,6 | 103,5 | 113,2 |
| **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | **-24,8** | **8,3** | **33,9** | **78,4** | **127,9** | **144,5** | **104,7** |
| Rentuútreiðslur netto og virðisjavnan | 14,5 | 20,5 | 22,0 | 20,6 | 25,3 | 38,7 | 37,1 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **-39,3** | **-12,3** | **11,9** | **57,8** | **103,1** | **105,8** | **67,5** |
| | | | | | | | |
| **Íløgur tils.** | **96** | **148** | **155** | **275** | **232** | **251** | **728** |
| **Aktiv tils.** | **1.287** | **1,411** | **1.475** | **1.742** | **1.960** | **2.236** | **2.616** |
| **Gjaldføri** | **57** | **87** | **67** | **132** | **222** | **343** | **124** |
| **Eginogn** | **885** | **870** | **882** | **940** | **1.042** | **1.149** | **1.216** |
| **Skuld tils** | **382** | **519** | **575** | **783** | **898** | **1.068** | **1.381** |
| **NIBD/EBITDA** | **7,4** | **4,9** | **4,3** | **3,6** | **2,8** | **2,6** | **5,5** |

Úrslitið í 2017 verður ætlandi eitt avlop á 67,5 mió. kr., har EBITDA í mun til nettoskuldina verður 5,5 ferðir, svarandi til eina renting av eginpeninginum upp á 5,7 %. SEV ætlar at broyta elprísin í 2017 við eini lækking uppá 0,05 kr. pr. kWt. Tey føstu gjøldini verða óbroytt.

Komandi 5 árini er neyðugt at hava eitt munagott yvirskot soleiðis, at rakstur felagsins kann geva eina munagóða sjálvsfígging til fíggingina av íløgunum, sum standa fyri framman. Somuleiðis skal inntøkustyrkin í rakstrinum verða á einum slíkum støði, at felagið er ført fyri at halda sínar skyldur, sjálvt um afturgongd verður.

Fyri at røkka hesum máli hevur SEV, umframt at meta um tørvin fyri at javna prísin, kannað raksturin og gjørt metingar av útreiðslum og íløgum, sum eru ætlaðar komandi ár. Sí brot 6 um haldførið í fíggjarætlanini 2017-2025.

### 5.1.1 Gongdin í arbeiðinum við lønseminum í inntøkunum seinstu árini

SEV sendi eigarunum uppskot til rakstrar-, fíggjar- og íløguætlan fyri 2012 hin 5. desember 2011 við uppskoti um at hækka elprísin 0,25 kr. pr. kWt í 2012. Elveitingareftirlitið gav felagnum loyvi til at hækka prísin 0,15 kr. pr. kWt, tí sendi SEV eigarunum nýtt uppskot til rakstrar-, fíggjar- og íløguætlan fyri 2012 tann 18. desember 2011, har hækkingin var 0,15 kr. pr. kWt. Nevndin framdi eisini sparingar upp á 5 mió. kr. í mun til upprunaætlanina.

Eigararnir samtyktu á aðalfundinum 19. desember 2011 at hækka elprísin við 0,10 kr. pr. kWt í staðin fyri 0,15 kr. pr. kWt, og dagførdi SEV tí rakstrar-, fíggjar- og íløguætlanina fyri 2012 hin 19. desember 2011 í samsvari við ynskini hjá eigarunum. Harumframt var SEV álagt at finna inntøkur og/ella sparingar fyri aðrar 5 mió. kr. soleiðis, at inntøkurnar tilsamans og sparingarnar skuldu verða 10 mió. kr. í 2012.

Við hesum var sambært rakstrar-, fíggjar- og íløguætlanini fyri 2012 roknað við einum halli á 6,3 mió. kr. ístaðin fyri upprunaætlanina upp á 16,3 mió. kr. í halli. SEV legði fíggjarætlanina fyri 2013 fram á eykaaðalfundi 30. november 2012. Í hesum sambandi var ført fram, at SEV framhaldandi bleiv rikið við undirskoti, og sum ikki er nøktandi í longdini. Tí var neyðugt at fremja haldgóðar loysnir herundir áseting av einum nøktandi kWt-prísi.

SEV gjørdi tí nógv burtur úr at hyggja eftir prísskránni fyri at meta um, hvørt einstøku prísirnir vóru teir røttu. Harumframt gjørdi SEV lønsemisútrokningar fyri kundabólkar og kundar, og úrslitið av hesum vísti, at vinnulívskundarnir í bólkinum, sum verður nevndur ídnaðarbólkurin, ikki vóru nøktandi prísaðir.

Í 2013 og 2014 varð serstaka gjaldskráin broytt soleiðis, at teir kundar, sum brúka meira enn 20.000 kWt, skuldu rinda 0,11 kr. pr. kWt meiri í 2013. Hetta er 0,06 kr. pr. kWt meiri enn aðrir kundar fingu í príshækking. Í 2014 hækkaði prísurin fyri henda kundabólk við 0,05 kr.pr. kWt, meðan aðrir kundar hjá SEV onga príshækking fingu. Fasta gjaldið fyri kundarnar í hesum bólki var eisini hækkað við 600 kr. samstundis sum "minstamarkið" fyri, nær kundar í serstøku gjaldskránni skulu fáa lægsta prís var hækkað við 10.000 kWt frá 20.000 kWt til 30.000 kWt.

Niðanfyri standandi talva vísir yvirlit yvir úrslitið pr. kWt fyri kundar í ídnaðarbólkinum við eini nýtslu størri enn 30.000 kWt, tá ið talan er um inntøkur í mun til oljukostnaðin. Talið fyri 2016 er framroknað, meðan talið fyri 2017 er ætlað.

| Kr. pr. kWt | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | F2016 | Æ2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Sølukostnaður pr. kWt í ídnaðarbólkinum | 0,89 | 0,99 | 1,10 | 1,15 | 1,15 | 1,15 | 1,10 |
| Oljukostnaður pr. seldan kWt framleiddur við olju íroknað eginnýtslu og nettap | 0,92 | 1,02 | 0,99 | 1,01 | 0,75 | 0,36 | 0,49 |
| Úrslit | -0,03 | -0,03 | 0,11 | 0,14 | 0,40 | 0,79 | 0,61 |

Sum talvan omanfyri vísir, var kostnaðurin av hvørjum kWt framleiddur úr olju 1,02 kr. pr. kWt í 2012, meðan kundarnir í hesum bólkinum rindaðu 0,99 kr. pr. kWt. (u/MVG) svarandi til, at SEV hevði eitt undirskot áðrenn annan kostnað á 0,03 kr. pr. kWt, sum aðrir kundar skuldu rinda fyri. Við øllum hesum omanfyri nevndu tiltøkum og fallandi oljuprísi í 2014-2016 hevur SEV megnað at betra um lønsemið í kundabólkinum frá at hava eitt undirskot á 0,03 kr. pr. kWt í 2012 til væntandi at hava eitt yvirskot á 0,65 kr. pr. kWt í 2017 áðrenn annan kostnað.

Verður hædd tikin fyri samlaða kostnaðinum, sær myndin soleiðis út, sum niðanfyri standandi talva vísir. Talan er um miðal kostnaðin og miðal søluprísin pr. seldan kWt.

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | F2016 | Æ2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Inntøka | 1,07 | 1,11 | 1,10 | 1,25 | 1,37 | 1,41 | 1,46 | 1,47 | 1,43 | 1,39 |
| Kostnaður | 1,13 | 1,05 | 1,28 | 1,40 | 1,42 | 1,37 | 1,25 | 1,11 | 1,07 | 1,17 |
| Úrslit | -0,06 | 0,06 | -0,18 | -0,15 | -0,05 | 0,04 | 0,21 | 0,37 | 0,36 | 0,22 |

Fyri 2017 verður ætlað, at famleiðslukostnaðurin fyri hvønn kWt verður 1,17 kr., meðan hvør kWt í miðal verður seldur fyri 1,39 kr. svarandi til, at SEV hevur yvirskot á 0,22 kr. fyri hvønn seldan kWt. Eisini her kann staðfestast, at SEV hevur megnað at betra lønsemið í rakstrinum við at hava eitt undirskot í 2010 á 0,18 kr. pr. kWt til at hava eitt yvirskot á 0,22 kr. pr. kWt í 2017. Tær útreiðslur og íløgur, sum ætlaðar eru fyri 2017, metir SEV eru neyðugar at fremja fyri at hava eina trygga og góða elveiting.

Gjaldskráin 1. januar 2017 verður sum talvan niðanfyri vísir.

| Árlig nýtsla í kWt | Fast gjald um árið í kr. | 2010 prísur í kr. uttan og við MVG | 2011 prísur í kr. uttan og við MVG | 2012 prísur í kr. uttan og við MVG | 2013 prísur í kr. uttan og við MVG | 2014 prísur í kr. uttan og við MVG | 2015 prísur í kr. uttan og við MVG | 2016 prísur í kr. uttan og við MVG | 2017 prísur í kr. uttan og við MVG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 0-10.000 | 480 | 1,21/1,51 | 1,36/1,70 | 1,46/1,83 | 1,51/1,89 | 1,51/1,89 | 1,51/1,89 | 1,51/1,89 | 1,46/1,83 |
| 10.000-100.000 | 1.280 | 1,13/1,41 | 1,28/1,60 | 1,38/1,73 | 1,43/1,79 | 1,43/1,79 | 1,43/1,79 | 1,43/1,79 | 1,38/1,73 |
| >100.000 | 5.280 | 1,09/1,36 | 1,24/1,55 | 1,34/1,68 | 1,39/1,74 | 1,39/1,74 | 1,39/1,74 | 1,39/1,74 | 1,34/1,68 |

Serstøk gjaldskrá er galdandi fyri ídnaðarvirkir, fiskaaling, landbúnað, fiskivinnu og ávísar edv-tænastur – í frágreiðingini nevndir ídnaðarbólkurin). Hendan er sum víst niðanfyri.

| Árlig nýtsla í kWt 1) | Fast gjald um árið | 2010 prísur í kr. uttan MVG | 2011 prísur í kr. uttan MVG | 2012 prísur í kr. uttan MVG | 2013 prísur í kr. uttan MVG | 2014 prísur í kr. uttan MVG | 2015 prísur í kr. uttan MVG | 2016 prísur í kr. uttan MVG | 2017 prísur í kr. uttan MVG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 0-10.000 | 480 | 1,21 | 1,36 | 1,46 | 1,51 | 1,51 | 1,51 | 1,51 | 1,46 |
| 10.000-30.000 | 1.280 | 1,13 | 1,28 | 1,38 | 1,43 | 1,43 | 1,43 | 1,43 | 1,38 |
| > 30.000 | 9.680 | 0,74 | 0,89 | 0,99 | 1,10 | 1,15 | 1,15 | 1,15 | 1,10 |

1) Árlig nýtsla í kWt 10.000-20.000 og størri enn 20.000 fram til og við 2014. Fasta gjaldið fyri kundar við eini nýtslu > 30.000 hækkar 600 kr. árliga í 2015. Fram til 2014 er hetta gjald 9.080.

Ein vanligur sethúsakundi við eini nýtslu á 8.000 kWt árliga skal rinda fasta gjaldið á 480 kr. umframt 1,46 kr. pr. kWt svarandi til 11.680 kr., ella tilsamans 12.160 kr. Harafturat skal leggjast MVG á 25% svarandi til 3.040 kr. soleiðis, at rindast skal 15.200 kr. ella 1.267 kr. um mánaðin. Er talan um eina nýtslu á 6.000 kWt árliga, skal rindast 11.550 kr. árliga svarandi til 963 kr. um mánaðin.

## 5.2 Elsølan og elframleiðslan

Vøksturin í elnýtsluni hevur verið, sum talvan niðanfyri vísir.

| Ár | Avroknað elnýtsla til kundar í GWt | Vøkstur í GWt | Vøkstur í % |
|---|---|---|---|
| 2007 | 256,8 | 15,2 | 6,3 |
| 2008 | 258,9 | 2,1 | 0,8 |
| 2009 | 252,0 | -6,9 | -2,7 |
| 2010 | 255,0 | 3,0 | 1,2 |
| 2011 | 254,8 | -0,2 | -0,1 |
| 2012 | 261,4 | 6,6 | 2,6 |
| 2013 | 274,4 | 13,0 | 5,0 |
| 2014 | 283,8 | 9,4 | 3,4 |
| 2015 | 288,1 | 4,3 | 1,5 |
| 2016 Framroknað | 295,8 | 7,7 | 2,7 |
| 2017 Ætlað | 303,4 | 7,6 | 2,6 |

Talvan omanfyri vísir, at roknað verður við eini øking í elnýtsluni á 2,6% í miðal í 2017 í mun til 2,7% í 2016. Hendan øking stavar frá vøkstri í fleiri kundabólkum við ymiskum vakstrartølum, meðan afturgongd er innan aðrar bólkar, sí frammanfyri standandi talvu á síðu 10 í frágreiðingini.

Roknað verður við eini øking í nýtsluni orsakað av størri framleiðslu til vinnukundarnar. Privatkundar felagsins taka í nýtslu alt fleiri tól, sum brúka el – eitt nú hitapumpur, fleiri flatskermar og teldur pr. brúkara. Hinvegin eru hesir brúkarar vorðnir meiri tilvitaðir um sparitiltøk, sum hvør einstakur kann gera. Til dømis at skifta til ledperir, sum eru munandi meira orkusparandi enn vanligar perur. Harumframt keypa privatkundarnir eltól, sum brúka minni orku enn tey gomlu.

Roknað verður við, at privat kundar felagsins hava eina framgongd upp á 2% í nýtsluni í 2017. Aðrir kundabólkar liggja millum 0,5 og 2,0% framgongd. Tó verður væntað, at stór framgongd verður innan alikundar felagsins, og ætlað verður við eini framgongd uppá 10% innan bólkin “landbúnaður, aling, fiskivinna og ráevnisvinna”.

Niðanfyri standandi talvur vísa gongdina í framleiðsluni í GWt og í % frá 2009-2015, har tølini eru staðfest, meðan talið fyri 2016 er framroknað og fyri 2017 ætlað.

| Framleiðsla í GWt | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | F2016 | Æ2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tilsamans | 275,5 | 280,3 | 273,8 | 291,6 | 292,5 | 305,4 | 314,4 | 319,2 | 326,8 |
| Termisk | 168,1 | 199,3 | 166,8 | 181,0 | 180,1 | 150,2 | 125,5 | 146,0 | 152,9 |
| Vatn | 92,4 | 67,4 | 92,5 | 99,8 | 90,6 | 120,7 | 133,1 | 118,0 | 118,0 |
| Vindur | 15,0 | 13,6 | 14,5 | 10,8 | 21,8 | 34,5 | 55,8 | 55,3 | 55,9 |
| | | | | | | | | | |
| Svørt orka | 168,1 | 199,3 | 166,8 | 181,0 | 180,1 | 150,2 | 125,5 | 146,0 | 152,9 |
| Grøn orka | 107,4 | 81,0 | 107,0 | 110,6 | 112,4 | 155,2 | 188,9 | 173,3 | 173,9 |

| Framleiðsla í % | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | F2016 | Æ2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Termisk** | 61,1 | 71,1 | 60,9 | 62,1 | 61,6 | 49,2 | 39,9 | 45,7 | 46,8 |
| **Vatn** | 33,5 | 24,1 | 33,8 | 34,2 | 31,0 | 39,5 | 42,3 | 37,0 | 36,1 |
| **Vind** | 5,4 | 4,9 | 5,3 | 3,7 | 7,4 | 11,3 | 17,8 | 17,3 | 17,1 |
| **Tilsamans** | 100,0 | 100,0 | 100,0 | 100,0 | 100,0 | 100,0 | 100,0 | 100,0 | 100,0 |
| | | | | | | | | | |
| **Svørt orka** | 61,1 | 71,0 | 60,9 | 62,1 | 61,6 | 49,2 | 39,9 | 45,7 | 46,8 |
| **Grøn orka** | 38,9 | 29,0 | 39,1 | 37,9 | 38,4 | 50,8 | 60,1 | 54,3 | 53,2 |

Framleiðslan úr varandi orkukeldum er mett at verða 173,9 GWt í 2017 svarandi til 53,2% av samlaðu framleiðsluni. Termiska framleiðslan er fyri 2017 ætlað at verða 152,9 GWt svarandi til 46,8% av samlaðu framleiðsluni.

### 5.3 Vindorkukeyp frá Sp/f Vindrøkt og dótturfeløgum hjá SEV

Roknað verður við, at SEV sambært avtalu[2] við Sp/f Vindrøkt í Vestmanna fer at keypa vindorkuframleidda elmegi á umleið 6,7 mió kWt fyri 0,40 kr. pr. kWt. Hetta gevur eina útreiðslu til orkukeyp á 2,7 mió. kr., sum er roknað upp í fíggarætlanina fyri 2017.

Harumframt fer SEV at keypa vindorku frá báðum partafeløgunum, sum standa fyri rakstrinum av vindmyllulundini í Neshaga og í Húsahaga. Frá felagnum í Neshaga verða væntandi keyptir 16,0 GWt svarandi til eitt orkukeyp á 6,6 mió. kr. svarandi til 0,41 kr. pr. kWt.

Roknað verður við, at SEV í 2017 fer at rinda umleið 0,326 kr. pr. kWt fyri 41,4 GWt frá vindmyllulundini í Húsahaga svarandi til ein samlaðan kostnað upp á umleið 13,5 mió. kr. Roknað verður við, at alt tað garanteraða keypið av vindorku ikki kemur til sættis í 2017. Hædd verður tikin fyri hesum í framleiðsluni. Roknað verður samlað við einum orkukeypi á 23,2 mió. kr. í 2017. Orkukeypið frá Vindmyllulundini í Húsahaga og Neshaga framgongur ikki av fíggjarætlanini, tí talan er um eina samtaksætlan.

[2] Avtalan er útgingin tann 1. september 2013, og enn er avtalan ikki endurnýggjað.

## 5.4 Samlaðar inntøkur

| Kundabólkur | Framskrivað streymsøla í mió. kr. 2016 | Framskrivað fast gjald í mió. kr.2016 | Framskrivað Tilsamans =(1) | Ætlað Streymsøla í mió. kr. 2017 | Ætlað Fast gjald í mió. kr. 2017 | Ætlað Tilsamans =(2) | Broyting í kr. =(2-1) |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Landbúnaður, aling, fiskivinna og ráevnisvinna | 44,6 | 1,0 | 45,6 | 47,0 | 1,0 | 48,0 | 2,4 |
| Gerð, framleiðsla og byggivirksemi | 93,4 | 1,6 | 95,0 | 90,3 | 1,6 | 91,9 | -3,1 |
| Handils-, matstovu- og gistihúsvirksemi | 32,8 | 0,8 | 32,6 | 31,9 | 0,8 | 32,7 | 0,1 |
| Flutningur, postur og fjarskifti | 33,2 | 0,6 | 33,8 | 32,1 | 0,6 | 32,8 | -1,0 |
| Fígging, trygging og aðrar vinnutænastur | 5,4 | 0,1 | 5,5 | 5,2 | 0,1 | 5,4 | -0,1 |
| Almennar og privatar tænastur kirkjur, samkomur v. m. | 55,4 | 1,5 | 56,9 | 54,5 | 1,5 | 56,1 | -0,8 |
| Gøtuljós | 10,3 | 0,4 | 10,7 | 10,2 | 0,4 | 10,5 | -0,2 |
| Sethús, íbúðir, summarhús og neyst | 120,5 | 10,6 | 131,0 | 118,8 | 10,6 | 129,4 | -1,6 |
| Tilsamans | 395,6 | 16,7 | 412,2 | 390,0 | 16,7 | 406,7 | -5,5 |

Talvan omanfyri vísir, at roknað verður við eini minking í inntøkunum hjá felagnum í 2017 á 5,5 mió. kr. frá kWt-søluni svarandi til, at samlaða inntøkan av kWt-søluni er 390,0 mió. kr. Fasta gjaldið verður óbroytt, og gevur hetta SEV eina inntøku á 16,7 mió. kr.

Harumframt koma inntøkur av íbindingargjaldinum og annað á 15,2 mió. kr. soleiðis, at roknað verður við eini samlaðari inntøku á 421,9 mió. kr. móti 423,8 mió. kr. framroknað í 2016. Hetta svarar til, at SEV fær 1,9 mió. kr. minni í inntøkum í mun til framroknað fyri 2016.

## 5.5 Rakstrarútreiðslur

Samlaðu kostnaðir eru oljuútreiðslur, vindorkukeyp, rakstrarkostnaður, avskrivingar og rentur. Seinastu 2-3 árini hevur tað víst seg, at framroknaði kostnaðurin er væl lægri enn ætlað fyri sama árið. Orsøkin er, at ætlað verður á einum støði, har í ein ávísan mun hædd verður tikin fyri óvæntaðum viðlíkahaldum og havaríum, sum kunnu koma fyri. Hinvegin hevur eisini arbeitt verið við kostnaðinum fyri at tryggja, at hann ikki gerst størri enn neyðugt, sjálvt um ætlanin er hægri.

Rakstrarútreiðslurnar hjá felagnum verða vanliga býttar í lønir til starvsfólk, tilfar og tænastuveitingar. Hesir báðir bólkar verða aftur býttir millum netvirksemið, framleiðslu-virksemið og fyrisiting. Fyrisitingarútreiðslurnar hoyra í høvuðsheitum til netvirksemið, men talan er í ávísan mun um felagsútreiðslur, har ein partur eisini hoyrir til framleiðsluvirksemið.

### 5.5.1 Prístryggingarstrategi (Hedging) fyri olju, gjaldoyra og rentu

SEV hevur serliga seinastu tvey árini gjørt stórar íløgur í framleiðslueindir og net, og SEV skal framhaldandi gera stórar íløgur, eitt nú í víðkan av Sundsverkinum, væntandi fyri eina upphædd millum 700 og 800 mió. kr. Grundað á allar íløgurnar, sum SEV hevur gjørt og er í fer við at gera, kann sigast, at SEV í ein ávísan mun eisini er eitt verkætlanarfelag, har tað er neyðugt at hugsa langa tíð frameftir og leggja fíggjarætlanir, sum samsvara hesum. Hetta viðførir, at tað er umráðandi at kenna týdningarmiklu kostnaðirnar, eitt nú olju-, gjaldoyru- og rentukostnaðir.

Møguleikin hjá SEV at heinta øktan kostnað inn í gjøgnum elprísin ella onnur gjøld partvíst ella heilt, er avmarkaður, og møguleikin at hava undirskot ella ikki nøktandi úrslit av rakstrinum, letur seg bara gera í eitt ávíst tíðarskeið. Prísstøðið er í síðsta enda eitt mál fyri eigararnar hjá SEV og harvið politiskt tengt, við góðkenning frá Elveitingareftirlitinum, meðan fígging av øktum kostnaði umvegis gjaldføri frá fígging letur seg bara gera í eitt styttri tíðarskeið, og avmarkar møguleikarnar fyri ætlaðum íløgum, tá fíggjarliga orkan fer til at fíggja øktan kostnað.

Í sambandi við lántøku hjá SEV vilja fíggjarstovnar hyggja at roknskaparligu lyklatølunum fyri týdningarmiklastu økini, og kravið til hesi lyklatøl er støðufesti. Fyri at fáa kappingarføra fígging til vega er neyðugt hjá SEV at møta ella lúka krøvunum frá fíggjarveitarum um at avdekka týdningarmiklastu váðarnar mótvegis vaksandi kostnaði, eins og SEV sjálvt metir tað skilagott. Tá ið SEV fer út á lánimarknaðin at heinta fígging, verður SEV samanborið við onnur tilsvarandi feløg, og skal tí kappast við hesi um at tekkjast fíggjarveitarum, fyri at fáa bestu fíggingina.

SEV er ein áhugaverdur kundi at veita fígging til, og kann sambært ráðgevum tess skrásetast sum ein "investment grade" kundi. Hetta gevur møguleika fyri eina góða fígging upp á fleiri mátar. Skal SEV halda hetta "ratingstøði", er neyðugt at hava ein støðugan rakstur við einum nøktandi avkasti, sum ger, at roknskaparligu lyklatølini verða á hædd við lyklatølini hjá feløgunum, sum SEV kappast við um fíggingina.

Tí hevur SEV saman við SEB, sum er ráðgevari hjá SEV innan fíggjarøkið og "prístryggingar-økið", arbeitt við eini "prístryggingarstrategi" (hedgingstrategi) fyri olju, gjaldoyra og rentu. Prístryggingarstrategi'in er eisini partur av lánsavtalunum, sum felagið fekk og er um at fáa til vega. Somuleiðis hevur SEV saman við ráðgevara tess innan tryggingar Sp/f Íti (fyrr Willis Føroyar) arbeitt við avdekkan av tryggingarváða.

Ein avleiðing av íløguætlanini komandi árini er, at prístryggingarstrategi'in hjá felagnum fyri olju og gjaldoyra varð í 2015 víðkað til at fevna um 4 ár afturat inniverandi ári. Í skrivandi løtu er oljuprísurin lágur sammett við oljuprísin fyri 1-2 árum síðani tó so, at hann er uppeftir gangandi. At gera eina slíka prístrygging fyri eitt longri tíðarskeið er til fyrimunar fyri SEV, nú oljuprísurin er lægri enn undanfarnu árini.

Tó er hetta prísstøðið ikki avgerandi fyri sjálva prístryggingina, sum eigur at verða gjørd fyri at tryggja ein støðugan rakstur.

### 5.5.2 Strategi fyri trygging av oljuprísváða og gjaldoyrisváða

Sum omanfyri nevnt fer SEV undir í minsta lagi at avdekka oljuprísváðan eftir niðanfyri leisti.

| | Ár 1 | Ár 2 | Ár 3 | Ár 4 | Ár 5 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Oljuprístrygging** | 80% | 60% | 40% | 20% | 20% |

Hetta viðførir, at tryggingardekningurin verður stovnaður ár eitt fyri einstøku rakstrarárini. Í ár tvey verður hesin tryggingardekningur so øktur, fyri aftur at endurgeva ein avdekning upp á 5 ár. Hesin leistur tryggjar eina stigvísa stovnan av tryggingini á einum støði, sum endurgevur eina miðal prísgongd av teimum ymisku árunum. SEV avgerð sjálvt, hvønn leist felagið nýtir til trygging av oljuprísinum, til dømis fastprístrygging, trygging av toppprísi, trygging av topp- og botnprísi o.s.fr.

Samstundis sum tryggingardekningurin fyri prísin upp á oljuna verður gjørdur, verða teir dollarar sum skulu nýtast til oljukeypið keyptir upp á termin, fyri harvið eisini at avdekka gjaldoyrisváðan í dollarum.

### 5.5.3 Strategi fyri trygging av rentuváða

SEV fer, sambært avtalu við fíggjarveitararnar, undir at tryggja upp til 75% av skuldini til eina fasta rentu við eini gildistíð longri enn 12 mánaðir. Somuleiðis skal gildistíðin av fastløstu rentuni verða millum 5 og 8 ár. Hetta verður gjørt á tann hátt, at SEV kann arbeiða við avdekningum av rentuváðanum innanfyri eitt spenn millum 50 og 75% av skuldini til eina og hvørja tíð. Skuldin kann hava eina avtalaða fasta rentu ella eina broytiliga rentu, sum verður avdekkað við eini avtalu um um býting av broytiligari rentu til fasta rentu (rentuswap).

Hesin háttur krevur, at fastrentuskuldin skal viðlíkahaldast soleiðis at skilja, at tá ið fast-rentuparturin antin fellur undir 50% ella økist til yvir 75%, skulu tillagingar gerast í rentuumbýtingaravtalunum (rentuswaps-avtalunum). Hetta viðførir, at ávísar rentuum-býtingaravtalur skulu endast fyri til dømis at umganga, at ein størri partur enn 75% er rentutryggjaður. Hetta viðførir aftur, at virðið av rentuumbýtingaravtaluni skal gerast upp. Eitt jaligt virði lækkar fíggjartørvin hjá SEV, meðan eitt neiligt virði økir fíggjartørvin. Javningin av rentutryggingaravtalunum skal bókast yvir eginogn felagsins. SEV fer at stremba eftir, at hava eina javna samanseting av rentutryggingaravtalum yvir tíð, har málið íløtuni er at hava eina miðal fasta rentu millum 5 til 8 ár. Hetta áramál verður í sambandi við endur- og nýfíggingina hægri enn 8 ár, og verður strategi fyri trygging av rentuváða endurskoða í hesum sambandi.

### 5.5.4 Oljuútreiðslur

SEV hevur seinastu árini havt serar stórar útreiðslur av oljukeypi, og í ætlanini fyri 2016 var ætlað við eini oljuútreiðslu pr. tons olju[4] svarandi til 2.548 kr. Síðani er oljuprísurin fallin, men dollarin er styrktur, og í ætlanini fyri 2017 verður ætlað við einum oljuprísi pr. tons tungolju íroknað smyrji- og gassolju svarandi til 2.006 kr., sum er 542 kr. minni pr. tons.

[4] Íroknað smyrjiolju og gassolju.

Framroknað fyri 2016 verður roknað við einum prísi pr. tons tungolju íroknað smyrji- og gassolju upp á 1.458 kr., sum er 1.090 kr. minni pr. tons í mun til ætlað.

Niðanfyri í talvuni er tungoljunýtslan víst í tonsum síðani 2008-2015. Eisini framgongur ætlanin og framroknaðu tølini fyri 2016 umframt ætlaða nýtslan fyri 2017.

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 Ætlan | 2016 Fram-roknað | 2017 Ætlan |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tons | 33.683 | 34.554 | 39.748 | 33.961 | 36.746 | 36.893 | 30.880 | 25.738 | 28.969 | 31.425 | 32.875 |

SEV væntar at brúka 32.875 tons tungolju í 2017 móti framroknað 31.425 tonsum í 2016 ella 1.450 tons meira, tí framleiðslan veksur væntandi við 2,4%. Harafturat kemur gass- og smyrjiolja.

Framroknaðar oljuútreiðslur fyri 2016 eru mettar at verða 48,0 mió. kr., og oljuútreiðslurnar fyri 2017 verða ætlaðar til 69,0 mió. kr., sum er 21,0 mió. kr. hægri. At oljukostnaðurin hækkar við 21,0 mió. kr. kemur av hægri oljuprísi í 2017, umframt at oljugoymslan við ársenda 2016 er prísjavnað.

Fyri tann ikki prístryggjaða partin av oljukeypinum er støði tikið í "forward kurvini fyri oljuprísin av tungolju" pr. 12. oktober 2016 í miðal upp á 278 USD í 2017. Harumframt er dollarakursurin ásettur til 6,67 krónur fyri dollaran (667,00). Harumframt kemur gjald til oljuveitara, avgjald og vørugjald. Soleiðis er prísurin fastlagdur í ætlanini.

Oljuútreiðslurnar fyri 2017 verða ætlaðar til 69,0 mió. kr. svarandi til gott 19% (22% í 2016) av metta vindorkukeypinum, kostnaðinum, avskrivingunum og rentunum fyri 2017. Tí fær tað stóra ávirkan á rakstrarúrslitið, um gongdin í oljuprísinum og kursinum á dollaranum verður munandi øðrvísi enn tað, ið mett er í rakstrarætlanini.

Fyri at tryggja at kostnaðurin fyri oljuna ikki ávirkar fíggjarætlanina skeiva vegin, hevur SEV valt at prístryggja tungoljukostnaðin, eins og dollarar eru keyptir upp á termin. Hetta verður at gera sambært prístryggingarstrategi (hedgingstrategi) felagsins.

Prístryggingarætlanin hjá SEV er vald út frá tí meting, at tað hevur týdning fyri elfelagið at klára at halda fíggjarætlanina fyri komandi ár. Endamálið við at prístryggja (hedga) oljukeypið ella partar av tí er at stovnseta eina trygging fyri at minka um príssveiggið á framtíðar oljuprísinum í US-dollarum í mun til ætlaða keypið, umframt at kunna tillaga raksturin um stórar hækkingar koma fyri.

### 5.5.5 Tilfar og tænastuveitingar

Roknað er við einum samlaðum kostnaði á 65,1 mió. kr. í 2017 mótvegis ætlað í 2016 á 68,8 mió. kr., svarandi til ein lægri kostnað á 3,7 mió. kr. Hesin lægri kostnaðurin kann sundurgreinast soleiðis, at framleiðsluvirkini hava ein hægri kostnað á 0,4 mió. kr., netvirksemið ein lægri kostnað á 3,1 mió. kr. og fyrsitingin 1 mió. kr.

Verður hugt eftir framroknaðu tølunum, verður framroknað við 56,5 mió. kr. í 2016 móti eini ætlan á 68,8 mió. kr. svarandi til eina lækking á 12,3 mió. kr.

#### 5.5.5.1 Framleiðsluvirksemið

Talvan niðanfyri vísir gongdina í kostnaðinum fyri tilfar og tænastuveitingar fyri framleiðsluvirksemið seinastu árini í mió. kr. Tølini fyri 2007-2015 eru staðfest tøl.

| 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 Ætlan | 2016 Fram-roknað | 2017 Ætlan |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **55.610** | 53.125 | 32.089 | 31.778 | 43.251 | 27.628 | 24.069 | 21.139 | 21.280 | 27.270 | 22.648 | 27.657 |

Talvan omanfyri fyri framleiðsluvirksemið vísir, at ætlaði kostnaðurin fyri 2017 er á sama støði sum undanfarna ár. Kostnaðurin fyri 2017 er ætlaður at verða 27,7 mió. kr. mótvegis 27,3 mió. kr. ætlað í 2016.

Framroknaðu útreiðslurnar fyri 2016 verða mettar at gerast 22,6 mió. kr., sum er ein munandi lækking sammett við ætlanina fyri 2016 á 27,3 ella 4,7 mió. kr. lægri. Felagið hevur sum mál at vanda sær um útreiðslurnar, men gera tað viðlíkahald v.m., sum er neyðugt fyri at hava ein tryggan rakstur.

#### 5.5.5.2 Netvirksemið

Talvan niðanfyri vísir gongdina í kostnaðinum fyri tilfar og tænastuveitingar fyri netvirksemið seinastu árini í mió. kr. Tølini fyri 2007-2015 eru staðfest tøl.

| 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 Ætlan | 2016 Fram roknað | 2017 Ætlan |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 33.223 | 40.502 | 16.577 | 18.471 | 15.099 | 19.999 | 15.425 | 11.870 | 11.815 | 15.517 | 11.704 | 12.388 |

Talvan omanfyri fyri netvirksemið vísir, at kostnaðurin árini 2007-2013 hevur verið á einum munandi hægri støði enn framroknað fyri 2016 og ætlað fyri 2017.

Útreiðslur til tilfar og tænastuveitingar til netvirksemið eru ætlaðar til 12,4 mió. kr. í 2017 móti 15,5 mió. kr. ætlað í 2016. Hækkingin er 3,1 mió. kr. Framroknaði kostnaðurin fyri 2016 verður mettur at verða 11,7 mió. kr. móti ætlanini upp á 15,5 mió. kr. ella 3,8 mió. kr. lægri. Eisini netparturin hevur tálmað útreiðslunum fyri at røkka málinum um eitt nøktandi úrslit í 2016.

#### 5.5.5.3 Fyrisiting

Talvan niðanfyri vísir gongdina í kostnaðinum fyri tilfar og tænastuveitingar fyri fyrisiting seinastu árini í mió. kr. Tølini fri 2007-2015 eru staðfest tøl.

| 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 Ætlan | 2016 Fram roknað | 2017 Ætlan |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 12.380 | 15.748 | 12.685 | 15.036 | 16.516 | 11.860 | 14.577 | 16.824 | 16.840 | 26.055 | 22.190 | 25.055 |

Talvan omanfyri vísir kostnaðin fyri fyrisiting, íroknað kostnað til kanningar, ráðgeving og tap av skuldarum v.m. Hesin hevur ligið millum 12,4 mió. kr. og upp í 16,8 mió. kr. eitt vanligt ár.

Útreiðslurnar fyri 2017 verða ætlaðar til 25,1 mió. kr., sum er 1 mió. kr. hægri enn 2016. Fyrisitingarkostnaðurin er í løtuni á einum høgum støði orsakað fleiri verkætlanir, so sum menning av leiðarum og starvsfólkum, kanningar av ymiskum viðurskiftum eins og at fáa til vega neyðuga bankafígging. Hetta er kostnaður sum ikki í sama mun gongur aftur ár um ár.

Serliga er tað kostnaður til kanning og ráðgeving, sum er mettur til 11,2 mió. kr. Í 2017 er ætlanin at arbeiðið heldur áfram við fleiri verkætlanum eins og nýggjar koma til. Nevnast kann kanning av framleiðslu- og goymslumøguleikum, skipanarveitingum, kanning av nýggjum prísbygnaði, lesandi, vindætlan í Suðuroy, kostnaður til løgfrøði og grannskoðan, samskifti, gerð av nýggjum viðskiftatreytum og kundanøgdsemiskanningar.

Bankakostnaður og kostnaður fyri innkrevjing av peningi umvegis gjaldskipanina v.m. er mettur til 1,9 mió. kr.

Av øðrum fyrisitingarkostnaði kann millum annað nevnast tryggingar fyri 1,5 mió. kr., tele-samskifti og lýsingar 1,2 mió. kr., reingering 0,4 mió. kr., Kommunala Arbeiðsgevarafelagið 0,4 mió. kr., tap upp á skuldarar 1,0 mió. kr., viðlíkahald av bygningi 1,0 mió. kr., Elveitingar-eftirlitið 2,0 mió. kr. og skrivstovuhald 1,1 mió. kr. Kostnaður til kunningartøkni er mettur til 2,5 mió. kr.

Leiðaramenningin heldur áfram í 2017, og í hesum sambandi er avsett 0,8 mió. kr. til framhaldandi menning av leiðarum felagsins, eins og annar starvsfólkakostnaður er mettur til 2,0 mió. kr. í sambandi við menning, skeið, skúla og ferðing.

Ætlað var við einum kostnaði upp á 26,1 mió. kr., meðan hesin verður framroknaður til 22,2 mió. kr. ella 3,9 mió. kr. lægri.

### 5.5.6 Lønarútreiðslur

Talvan niðanfyri vísir gongdina í samlaðu lønarútreiðslunum seinastu árini í mió. kr. Tølini fyri 2007-2015 eru staðfest tøl.

| 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 Ætlan | 2016 Fram - roknað | 2017 Ætlan |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 53.051 | 57.168 | 62.307 | 65.061 | 62.576 | 60.187 | 58.706 | 63.644 | 64.338 | 72.372 | 68.486 | 67.158 |

Roknað verður við eini samlaðari lønarútreiðslu á 67,2 mió. kr. í 2017 mótvegis ætlaðum 72,4 mió. kr. fyri 2016. Í ætlanini fyri 2016 er ikki tikið hædd fyri, at ein partur av lønarútreiðsluni verður íløguførdur, tí SEV stendur fyri einum parti av ymisku íløguarbeiðunum.

Hetta er gjørt fyri 2017, og eru 6 mió. kr. íløguførdar svarandi til, at samlaðu lønarútreiðslurnar hjá felagnum eru 73,2 mió. kr. í 2017 mótvegis ætlað í 2016 uppá 72,4 mió. kr.

Framroknað fyri 2016 verða hesar 68,1 mió. kr. móti ætlað í 2017 uppá 67,2 mió. kr. har hædd er tikið fyri íløguføring.

Niðanfyri standandi talva vísir lønarútreiðslurnar hjá SEV seinastu árini, hædd er tikin fyri javning av eftirløn til starvsfólk, ið vóru tænastumanna starvssett og íløguføring av lønarkostnaði.

| | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 Ætlan | 2016 Fram-roknað | 2017 Ætlan |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarførd løn tilsamans | 53.051 | 57.168 | 62.307 | 65.061 | 62.576 | 60.187 | 58.706 | 63.644 | 64.338 | 72.372 | 68.486 | 67.158 |
| Javning eftirløn | 0 | 0 | 0 | 0 | 699 | -2.070 | 1.875 | -1.139 | 671 | 0 | -2.000 | 0 |
| Íroknað javning | 53.051 | 57.168 | 62.307 | 65.061 | 63.275 | 58.117 | 60.581 | 62.505 | 65.009 | 72.372 | 66.486 | 67.158 |
| Íløguføring | 2.153 | 1.979 | 2.458 | 1.192 | 1.372 | 4.391 | 3.665 | 4.990 | 6.083 | 0 | 6.069 | 6.000 |
| Løn tilsamans | 55.204 | 59.147 | 64.765 | 66.253 | 64.647 | 62.508 | 64.246 | 67.495 | 71.092 | 72.372 | 72.555 | 73.158 |
| Ársverk | | | | | | 157 | 159 | 160 | 161 | | 163 | 172 |

SEV fylgir almennu sáttmálunum innan tey ymisku arbeiðsøkini, sum eru viðkomandi fyri SEV. Roknað er við øktum starvsfólkatali í 2017 innan ávís øki, eins og lagt er upp fyri lønarhækkingum, sum lønarsamráðingar hava við sær á teimum ymisku sáttmálaøkjunum.

Talvan niðanfyri vísir samlaðu lønarútreiðslurnar sundurgreinaðar á framleiðsluvirksemið, netvirksemið og fyrisitingina seinastu árini. Tølini fyri 2007-2015 eru staðfest tøl.

| | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 Ætlan | 2016 Fram-roknað | 2017 Ætlan |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fram-leiðsla | 24.684 | 23.937 | 32.878 | 31.103 | 32.135 | 28.327 | 30.652 | 30.881 | 32.022 | 30.556 | 32.959 | 28.998 |
| Net | 16.507 | 18.615 | 19.326 | 23.915 | 20.420 | 19.999 | 19.453 | 19.876 | 21.109 | 29.946 | 22.086 | 25.584 |
| Fyri-siting | 11.860 | 14.616 | 10.073 | 10.043 | 10.021 | 11.860 | 8.601 | 12.887 | 11.205 | 11.869 | 13.441 | 12.576 |
| Til-samans | 53.051 | 57.168 | 62.277 | 65.061 | 62.576 | 62.187 | 58.705 | 63.644 | 64.338 | 72.372 | 68.486 | 67.158 |

Talvan omanfyri vísir, at lønarútreiðslurnar hava verið vaksandi frá 2007 til og við 2010 fyri síðani at minka fram til 2014 fyri síðani at veksa aftur í 2015 til 2016. Tá er hædd tikin fyri íløgurføring av lønarkostnaði.

Felagið hevur sett fleiri fólk í starv fyri at nøkta tørvin á arbeiðsmegi orsakað nógvu og fjølbroyttu verkætlanirnar, sum felagið er í holt við í løtuni.

Lønarútreiðslurnar til framleiðsluvirksemið hava síðani 2009 fram til ætlað í 2017 verið um góðar 30 mió. kr.

Lønarútreiðslurnar til netvirksemið hava verið vaksandi, og roknað er í 2016 við fleiri ársverkum á økinum fyri at nøkta tørvin at tryggja arbeiðið við teimum mongu verkætlanum, sum liggja fyri framman.

Lønarútreiðslurnar til fyrisitingina hava síðani 2009 fram til 2012 verið umleið á sama støði. Framroknaði kostnaðurin fyri 2015 og ætlaði kostnaðurin fyri 2016 er lækkaður í mun til ætlað 2015, har orsøkin er hækkandi sundurbýting av lønarkostnaðinum til framleiðslupartin við 1,2 mió. kr. Harumframt er í 2016 roknað við eini kostnaðarjavning av tænastumannaeftirlønum upp á 1,2 mió. kr. grundað á lækkaða rentustøðið. Um hædd verður tikin fyri hesum báðum kostnaðum, er lønarkostnaðurin til fyrisitingina nakað lægri enn undanfarna ár.

Í sambandi við samsýning av nevnd kann upplýsast, at nevndarformaðurin fær eina fasta nevndarløn upp á 12.612 kr. um mánaðin, næstformaðurin fær 9.459 kr. um mánaðin, meðan nevndarlimir fáa 6.306 kr. um mánaðin.

Harumframt fáa nevndarlimir eina fundarsamsýning samsvarandi almennum gjøldum eftir tænastumannasáttmálanum. Henda samsýning er millum 552 kr. og 1.656 kr. pr. fund alt eftir longdini av fundinum.

Eisini fáa nevndarlimir endurgjald fyri ferðing.

Um so er, at nevndarlimir eru limir í øðrum nevndum, eitt nú dótturfeløgum hjá SEV og bygginevndum, fáa teir eina eyka samsýning fyri hetta arbeiði alt eftir, hvussu umfatandi arbeiðið er.

Samlaða samsýningin til nevndina fyri 2016 verður framroknað til 1,0 mió. kr. Vanliga hevur nevndin ein fastan fund um mánaðin, umframt eykanevndarfundir, fundir við kommunurnar, aðalfundir og aðrir fundir við myndugleikar. Fyri 2017 verður samsýningin v.m til nevndina ætlað til 1,1 mió. kr. Harumframt kemur endurgjald fyri ferðakostnað.

### 5.5.7 Avskrivingar

Avskrivingar eru ætlaðar til 113,2 mió. kr. fyri 2017 móti framroknaðum 103,5 mió. kr. fyri 2016 við støði í verandi ognum umframt ársins til- og frágongd av ognum. Hetta er ein øking á 9,7 mió. kr. í mun til framroknað fyri 2016.

Býtið av avskrivingunum millum árini kann broytast nakað, alt eftir nær ognirnar verða tiknar í nýtslu. Hetta verður javnað millum tilgongd og arbeiði í gerð. Men avskrivingarnar hjá felagnum fara at verða vaksandi komandi árini, tí stórar íløgur verða gjørdar, og hetta økir um kostnaðin til avskrivingar.

Avskrivingarnar í ætlanini fyri 2017 og frameftir taka støði í teimum kravdu avskrivingarára-málunum, ásettar av Elveitingareftirlitinum. Í ætlanini verða framleiðsluognir í miðal avskriv-aðar yvir 35 ár og bygningar yvir 50 ár. Íløgur í netvirksemið verða í miðal avskrivaðar yvir 35 ár, eins og íløgur í rakstrargøgn verða avskrivaðar í miðal yvir fimm ár. Íløgur í sambandi við livitíðsleingingar verða avskrivaðar yvir áramálið av gjørdu livitíðsleingingini.

### 5.5.8 Rentur og javnan av kapitalpørtum

Eingin virðisjavnan upp á kapitalpartar av dótturfeløgum eru ætlaðar í fíggjarætlanini fyri 2017, tí talan er um samtaksætlanina. Rentuútreiðslur eru mettar út frá galdandi lánsavtalum og ætlaðum nýggjum lánum.

Fyri 2017 er ætlað við eini nettorentuútreiðslu á 37,1 mió. kr. Nettorentuútreiðslan fyri 2016 er framroknað til 38,7 mió. kr. Í hesi upphædd er innroknað stovningarprovisión uppá 8,3 mió. kr. til nýggju lántøkuna hjá felagnum uppá tilsamans 1.670 mió. kr. Henda lántøka verður brúkt til at endurfíggja verandi skuld, ætlaðar íløgur og gjaldføri. Roknað er við einum rentustigi upp á 3%, tá er hædd tikin fyri hægri kostnaði, tá ið talan er um fasta rentu. Hesin kostnaður er enn ikki endaliga fastlagdur.

Øktu rentuútreiðslurnar seinastu árini stava frá øktari lántøku til íløgur og rakstur, sum SEV hevur tikið. Í 2008 vóru rentuútreiðslurnar 3,5 mió. kr. mótvegis eini langfreistaðari skuld á 105,8 mió. kr. við árslok sama ár. Við ársenda 2016 verður langfreistaða bruttoskuldin framroknað til 1.000 mió. kr. Í 2017 er ætlað við eini hækking av lántøkuni á umleið 320 mió. kr. Langfreistaða bruttoskuldin við árslok 2017 verður tí ætlað til 1.320 mió. kr.

Rentuinntøkurnar frá gjaldførinum eru ásettar til 0,0 mió. kr.

SEV

## 5.6 Íløgur

Roknað verður við íløgum fyri 728,1 mió. kr. í 2017. Av talvuni framganga eisini staðfestu tølini í 2012 til 2015, eins og tølini fyri framroknað og ætlað 2016 og ætlað 2017. Íløgurnar fyri 2017 verða býttar soleiðis sum niðanfyri standandi talva vísir.

| Íløgur í mió. kr. | 2017Æ | 2016F | 2016Æ | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fossáverkið | 4,8 | 0,6 | 2,3 | 4,3 | 16,2 | 10,1 | 2,5 |
| Heygarverkið | 0,2 | 0,2 | 0,4 | 0,1 | 0,5 | 13,1 | 3,3 |
| Mýruverkið | 3,7 | 3,4 | 2,7 | 5,5 | 0,9 | 1,1 | 1,9 |
| Eiðisverkið | 3,2 | 1,6 | 1,8 | 2,4 | 6,5 | 47,8 | 50,9 |
| Verkið í Botni | 1,7 | 0,5 | 2,0 | 0,6 | 0,3 | 0,4 | 0,1 |
| Vágsverkið | 12,1 | 34,1 | 18,2 | 68,0 | 15,4 | 2,3 | 1,7 |
| Verkið í Trongisvági | 1,0 | 1,2 | 3,7 | 0,0 | 0,4 | 0,7 | 1,8 |
| Sundsverkið | 470,3 | 104,1 | 142,8 | 41,2 | 36,9 | 8,3 | 7,8 |
| Strond | 9,0 | 3,6 | 4,6 | 0,5 | 4,8 | 3,0 | 1,3 |
| Smærri verk | 4,0 | 4,6 | 5,5 | 1,1 | 0,4 | 4,2 | 0,1 |
| Vindmyllur v.m. | 50,5 | 0,0 | 0,5 | -2,0 | 0,4 | 16,5 | 48,1 |
| **Framleiðsluvirksemið íløgur tilsamans** | **560,4** | **153,8** | **184,3** | **121,7** | **178,8** | **107,4** | **119,5** |
| Net, koplingarstøðir, bygningar v.m. | 140,7 | 87,6 | 159,6 | 95,8 | 89,0 | 43,5 | 30,3 |
| Fyrisiting við bygningum | 27,0 | 9,4 | 33,5 | 14,6 | 7,4 | 4,1 | 4,0 |
| **Netvirksemið íløgur tilsamans** | **167,7** | **97,0** | **193,1** | **110,4** | **96,4** | **47,6** | **34,3** |
| **Ætlaðar íløgur tilsamans** | **728,1** | **250,7** | **377,4** | **232,1** | **275,2** | **155,0** | **153,8** |
| | | | | | | | |
| Ætlað 2012-2015 / Framroknað 2016 | | **377,4** | | **407,5** | **375,9** | **286,7** | **188,3** |
| Minni íløgur enn ætlað | | **-126,7** | | **-175,4** | **-100,7** | **-131,7** | **-34,5** |

Á Fossáverkinum eru dagføringar innan av bygninginum gjørdar umframt av garðinum. Hesar hava sína byrjan í 2013. Eisini er nýtt kølivatnsfiltur til Fossá 2 innlagt í 2016. Í 2017 verður vegurin inn í Fonsdal at asfaltera fyri 1,0 mió. kr. Eisini verður neyðstreymsanlegg sett upp fyri 1,0 mió. kr., og stigborð skulu dagførast og umvælast fyri 2,0 mió. kr. Harafturat verða aðrar smærri íløgur gjørdar fyri 0,75 mió. kr. í 2017. Samlaða íløgan í Fossáverkið tryggjar, at verkið er at líkna við eitt nýtt verk.

Heygaverkið er dagført í tíðarskeiðnum 2012-2013 fyri stóra upphædd, tí eru ongar íløgur gjørdar í 2016, og verða bert møguliga gjørdar smáar íløgur í 2016, sum er útvegan av eykalutum til regulatorar og pumpur. Í 2017 er ætlanin at stuðla bakkan omanfyri vegin inn í Heygadal, hetta verður mett at kosta uml. 0,2 mió. kr. Samlaða íløgan í Heygaverkið tryggjar, at verkið er at líkna við eitt nýtt verk.

Arbeiðið uppá at livitíðarleingja Mýraverkið við tilhoyrandi vatnrøri at sandblása, og mála hesi og skifta ventilar og stigborð, hevur hildið á í 2016. Í 2016 eru higartil brúktar góðar 2,1 mió. kr. uppá hetta, og roknað verður við at brúka 3,4 mió. kr. tilsamans í 2016. Í 2017 skal vegurin niðan á Mýrarnar asfalterast fyri 1,1 mió. kr., veitir, stigborðhús og ljósleiðarar til stigborðhús skulu gerast fyri 2,45 mió. kr. Eisini skal vatnstøðumátari gerast fyri 0,1 mió. kr. Eftir íløgurnar 2015-2017 verður Mýraverkið at líkna við eitt nýtt verk.

Eiðisverkið við tilhoyrandi tunlum er liðugt og tikið í nýtslu. Nýggja turbinan á Eiðisverkinum var tikin í nýtslu á sumri 2012, eins og arbeiðið at dagføra turbinu 1 og 2 fór fram í 2012 og

2013. Verkið hevur harvið fingið eina nýggja turbinu, eins og tær báðar gomlu turbinurnar eru dagførdar til nútímans krøv. Íløgan í Eiðisverkið fyri 2016 á tær tilsamans 0,8 mió. kr. stavar mest frá útvegan av neyðaggregati umframt nøkrum smærri arbeiðum. Roknað verður við at brúka fyri uml. 1,5 mió. kr. tilsamans í 2016. Fyri 2017 verður eisini roknað við smærri íløgum fyri 3,2 mió. kr. har tær størstu eru uppseting av nýggjum dúki í rakstrartunli (1,2 mió. kr.) og asfaltering frá landsvegnum niðan til norðaru byrging vestur (0,65 mió. kr.). Verkið er í dag at meta við eitt nýtt verk.

Á verkinum í Botni eru húsini innan umvæld fyri 0,2 mió. kr. í 2016, viðlíkahald av veitum er gjørt fyri 0,1 mió. kr. Hesi arbeiði halda á fyri tilsamans 0,5 mió. kr. í 2016. Í 2017 verða veitir dagførdar fyri 0,2 mió. kr., og húsini verða framhaldandi umvæld fyri 0,5 mió. kr. Eisini verða aðrar smærri umvælingar gjørdar av ventilum á Ryskisvatni, turbinuhúsum, rørum og dagføring av PLC'arum. Talan verður um íløgur fyri tilsamans 1,65 mió. kr. í 2017.

Vágsverkið er útbygt við einum motori afturat, eins og verkið sjálvt verður framhaldandi víðkað við fleiri arbeiðsrúmum. Talan er um samlaðar íløgur fyri umleið 100 mió. kr. yvir tvey ár, harav 87,0 mió. kr. eru til framleiðslupartin. Av hesum verða 25,0 - 30,0 mió. kr. mettar at fara til nýggja motorin. Netparturin verður mettur til 13 mió. kr. Arbeiðið byrjaði í 2014, arbeitt bleiv alt 2015 á tamb og hevur hildið áfram í 2016. Í 2016 verður roknað við at brúka tilsamans 30 mió. kr. upp á Vágsverkið. Í 2017 er eisini ætlanin at gera fyrireikandi arbeiði til gerð av stýrisskipanum, transformarum og háspenningi fyri tilsamans 6 mió. kr., skifta botn á tangagarði fyri 0,3 mió. kr., tekja verandi bygning fyri 0,5 mió. kr., fremja møguliga umvæling av M3 fyri 1,0 mió. kr. eins og smærri íløgur skulu gerast fyri tilsamans 4,25 mió. kr.

Verkið í Trongisvági fekk í 2014 tveir nýggjar transformarar, eins og verkið bleiv umvælt innan. Liðugtgerð fyri 0,3 mió. kr. er gjørt í verkið í 2015. Í 2016 byrjaði arbeiðið at taka gamla motorin niður og gera klárt til nýggja koplingarstøð. Í 2017 eru settar av 1,0 mió. kr. at taka motorin niður og gera klárt til nýggju koplingarstøðina. Hetta hevur eisini við sær, at anleggið í Trongisvági í framtíðini einans verður at síggja sum ogn hjá netpartinum.

Samlaðar íløgur í Sundsverkið væntast at verða 104,1 mió. kr. í 2016 og 470,3 mió.kr. í 2017.

Víðkanin av Sundsverkinum varð góðkend á eykaaðalfundi 30. september 2016. Av samlaðu íløguni á 800 mió. kr. væntast at verða nýttar 68 mió. í 2016, 385 mió. í 2017, 112 mió. í 2018 og 135 mió.kr. í 2019, tá víðkanin væntast liðug.

Nýggjur tangagarður og nýtt dagtangahús er í gerð. Samlaði kostnaðurin av hesum – íroknað tangagarð, bygningur, tangar og teknisk útgerð eins og elarbeiðið - er mettur at verða 133,9 mió. kr.

Nýggjur elketil verður keyptur í 2017 fyri 7,5 mió. kr. Ætlandi skal avtala gerast við Fjarhitafelagið um nýtslu av einum parti av elketlinum. Aðrar íløgur í 2017 eru í M4 motorin, sum skal hava nýggjar kølarar, fyri 5,2 mió. kr., aðrar umleggingar og dagføringar fyri 5,5 mió. kr. og aðrar smærri íløgur fyri 3,1 mió. kr. í 2017.

Arbeiðið at dagføra verkið við Strond heldur áfram í 2016 og í 2017. Íløgurnar í verkið í 2016 væntast at verða 3,6 mió. kr., meðan íløgur í 2017 væntast at verða í uppstígan av vatnturbinu og kontrollanlegg fyri 5 mió. kr umframt aðrar íløgur fyri 4 mió.kr.

Íløgur í battarístøð og stabilisering í Húsahaga er sett til 8,5 mió. kr. í 2016 og 8,3 mió. kr. í 2017. Talan er um eina umfatandi battaríverkætlan, sum skal virka fyri, at SEV kann fáa sum mest av vindi inn á elnetið.

Í 2017 verður ætlað við einum útboði av uppseting av vindmyllum í Suðuroy, og í hesum sambandi eru avsettar 50 mió. kr. til endamálið soleiðis, at SEV kann taka lut í einum møguligum útboði.

Stórar íløgur innan net, koplingarstøðir, bygningar og annað skulu gerast í 2016 og í árunum sum koma. Serliga er talan um at styrkja netið, og gera tað ført fyri at taka ímóti meiri vindorku, og víðkanin av Sundsverkinum har neyðugt er við eini støð 3. Nýggja koblingsstøðin til vindmyllulundina í Húsahaga er bygd liðug. Kostnaðurin av hesi liggur um 60,4 mió. kr. tilsamans, harav 45 mió. kr. í 2014 og 14,9 mió. kr. í 2015. Í 2016 er roknað við 0,6 mió. kr.

Nýggja koblingsstøðin í Runavík er liðugt bygd í ár, samlaði kostnaður fyri koblingsstøðina er nú 36,3 mió. kr. Í 2016 hevur íløgan verið 17,2 mió. kr. og roknað verður við at hon verður 18 mió. kr. við árslok. Í 2017 verður roknað við 0,25 mió. kr. afturat til hesa koblingsstøð.

Koblingsstøðin innan Eið er í gerð. Í 2016 verður íløgan væntandi 8 mió. kr. og í 2017 verður hon 27 mió. kr., tá koblingsstøðin væntandi er liðug gjørd.

Íløgan í býtisvirkir í 2016 verður væntandi 38,8 mió. kr., har serliga íløgan í 10kV kaðal millum Strond og Hvannasund fyri 5,8 mió. kr. og í 10kV kaðal millum Hvannasund og Viðareiði fyri 4,0 mió. kr. umframt trafostøð Inni á Dølum á Viðareiði fyri 2,0 mió. kr. eru størstu íløgurnar.

Samlaða íløgan fyri býtisvirkir í 2017 er 39,1 mió. kr. Hendan býtist soleiðis: Netøkið fyri Norðuroyggjar skal gera íløgur fyri 8,0 mió. kr., økið fyri Eysturoy íløgur fyri 6,2 mió. kr, økið fyri Vágoy fyri 0,5 mió. kr., økið fyri Miðstreymoy 0,5 mió. kr., økið fyri Suðurstreymoy íløgur fyri 5,5 mió. kr., økið fyri Sandoy íløgur fyri 0,5 mió. kr., og økið fyri Suðuroy skal gera íløgur fyri 2,0 mió. kr. Afturat hesum eru ætlaðar 12,1 mió. kr. til úbygging av 10 kV, 20 kV og 60 kV netinum. Akfør skulu keypast fyri 3,0 mió. kr. í 2017.

Innleggingardeildin skal gera íløgur fyri 7,1 mió. kr. í fjaravlisnar málarar v.m., Løðistandarar til elbilar skulu uppsetast, og íløgan í hesar í 2016 er 2,0 mió. kr., og fyri 2017 er íløgan 1,0 mió. kr.

Nýggj stýrisskipan av elnetinum er undir menning saman við veitaranum. Hetta arbeiðið er byrjað, og verður nú mett at kosta umleið 9,5 mió. kr., harav 1,5 mió. kr. eru settar av í 2016 og 8 mió. kr. í 2017.

Væntandi fer SEV undir at byggja 6 nýggjar koplingarstøðir fyri 285,9 mió. kr. í inniverandi ári og komandi 4 árini. Harumframt eru koplingarstøðirnar í Húsahaga og í Runavík lidnar. Mett verður, at SEV við hesum kann tinga seg til nøktandi prísir frá byggifyritøkum og veitarum av útgerð.

Ætlað er við 33,6 mió. kr. í íløgum til koplingarstøðir í 2016. Samskipaða innkeypið til koplingarstøðir, sum umrøtt í fíggjarætlanini fyri 2015, er enn ikki komið í lag, tí óvanliga nógvur skundur hevur verið á útbyggingum higartil hesum viðvíkjandi. Óvist er, í hvønn mun tað fer at eydnast at samskipa innkeypið, orsakað verandi umstøðum við nógvum virksemi og tíðarneyð, grundað á stóra eftirspurninginum eftir elorku frá kundum okkara.

Til koplingarstøðina í Húsahaga er roknað við 0,6 mió. kr., nýggj koplingarstøð í Runavík fyri tilsamans 37,0 mió. kr., harav 18,0 mió. kr. eru ætlaðar í 2016 og 0,25 mió. kr. í 2017.

Harumframt er sum umrøtt ætlað við nýggjari koplingarstøð Innan Eið fyri tilsamans 35 mió. kr., harav 8,0 mió. kr. í 2016 og 27,0 í 2017.

Samlaðar íløgur í koplingarstøðir í 2014 vóru ætlaðar til 275 mió. kr. og í 2015 fyri 266,9 mió. kr. Endurskoðað ætlan fyri 2016 og fram sær út sum niðanfyri standandi talva vísir.

| Stað/ár í mió. kr. | 2016F | 2017Æ | 2018 | 2019 | 2020 | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Húsahagi | 0,6 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,6 |
| Vestmanna | 0,2 | 3,0 | 30,0 | 10,0 | 0,0 | 43,2 |
| Sund, støð 3 | 2,0 | 15,0 | 35,0 | 10,0 | 0,0 | 62,0 |
| Sund, dagføring | 0,6 | 0,6 | 2,0 | 15,0 | 20,0 | 38,2 |
| Varðagøta | 0,2 | 2,2 | 15,0 | 15,0 | 8,0 | 40,4 |
| Runavík | 18,0 | 0,3 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 18,3 |
| Innan Eið | 8,0 | 27,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 35,0 |
| Tvøroyri | 0,0 | 1,0 | 2,0 | 2,0 | 0,0 | 5,0 |
| Klaksvík | 0,1 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,1 |
| Skálabotnur | 0,0 | 0,1 | 0,2 | 0,0 | 0,0 | 0,3 |
| Strond | 1,8 | 25,0 | 8,0 | 0,0 | 0,0 | 34,8 |
| Havnardalur | 2,2 | 5,6 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 7,8 |
| Aðrar | 0,0 | 0,2 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,2 |
| **Tilsamans** | **33,7** | **80,0** | **92,2** | **52,0** | **28,0** | **285,9** |

Eftir at hava gjørt metingar um lønsemið at víðka og dagføra verandi bygning við Landavegin til at hýsa verkstað og fyrisiting, var niðurstøðan, at tað betur lønaði seg at byggja ein nýggjan verkstaðar- og fyrisitingarbygning enn at víðka og dagføra verandi bygning við Landavegin. Hesin skuldi hýsa virkseminum, sum í løtuni er á Havnarverkinum eins og virkseminum á Landavegnum.

Eisini var ætlanin at selja Havnarverkið og bygningin við Landavegin, og í hesum sambandi skuldi peningurin mótroknast íløguni í nýggja bygningin.

Hetta verður ikki soleiðis. SEV hevur avgjørt at útseta hesa bygging, og henda stendur nú á fíggjar-ætlanini fyri 2022 við 50 mió. kr. og 2023 við 30 mió. kr.

Íløgur á 8,9 mió. kr. eru ætlaðar til  innbúgv, KT-útgerð og skráir, neyðstreymsanlegg v.m. í 2017.

Samlaðu íløgurnar fyri 2017 eru mettar til 728,1 mió. kr. Tó skal fyrivarni takast fyri kostnaðar-metingum av teimum ymisku verkætlanunum, sum lýstar eru omanfyri, og einstakar kost-naðarmetingar skulu kannast nærri.

### 5.7 Lántøka

Í løtuni arbeiðir felagið við at umskipa samlaðu bruttoskuldina sum er 830 mió. kr. og trekningsrættir upp á 270 mió. kr., tilsamans 1.100 mió. kr. eins og at fáa fíggjað ætlaðu íløgurnar, sum standa fyri framman. Harumframt eisini til gjaldføri.

Tilsamans er talan um eina um- og nýfígging upp á tilsamans 1.670 mió. kr., har 830 mió. kr. fer til umfígging av verandi bruttoskuld, meðan restin skal nýtast til at fíggja ætlaðar íløgur og gjaldføri. Nýggja fíggingin til SEV verður fingin til vega á Amerikanska Private Placement

marknaðinum við upp til 1.000 mió. kr., meðan 670 mió. kr. verður veitt SEV sum bankafígging frá føroyskum og donskum fíggjarveitarum.

Eisini verður ætlað, at SEV veitir dótturfeløgum sínum lán umvegis millumrokningar ella dótturfelagslán til at fíggja keypið av vindmyllunum frá SEV. Harumframt at fíggja dagliga raksturin hjá dótturfeløgunum.

Felagið hevur rentutryggjað 73% av bruttoskuldini uppá 830 mió. kr. og er hetta í tráð við strategi felagsins fyri trygging av rentuváða.

## 5.8 Gjaldførið

Talvan niðanfyri vísir í høvuðsheitum gjaldførið úr sundurgreinaða gjaldførisyvirlitinum hjá felagnum.

| Tølini eru í mió. kr. | Ætlan fyri 2016 | Staðfest og ætlað 2016 | Ætlan 2017 |
|---|---|---|---|
| Gjaldførisískoyti frá vanligum rakstri | 191,8 | 248,0 | 217,9 |
| Broyting, skuldarar, ognarar og goymslur | -131,2 | -7,0 | 8,0 |
| **Gjaldførisískoyti frá rakstri** | **60,6** | **241,0** | **225,9** |
| Íløgur og arbeiði í gerð | -271,7 | -250,7 | -728,1 |
| Lántøka inniverandi ár | 270,0 | 170,0 | 320,0 |
| Lántøka til umlegging av verandi lánum | 830,0 | 830,0 | 0,0 |
| Innfrían av verandi langfreistaðum lánum | -830,0 | -830,0 | 0,0 |
| Kapitalinntøkur og rentukostnaður netto | -28,4 | -38,7 | -37,1 |
| Goldnir avdráttir | 0 | -0.0 | 0 |
| **Gjaldførisbroyting tilsamans** | **30,5** | **121,6** | **-219,4** |
| Ágóði við ársbyrjan | 162,3 | 221,9 | 343,5 |
| **Gjaldførið við ársenda** | **192,8** | **343,5** | **124,1** |

Miðað verður altíð eftir at hava eitt gott og trygt gjaldføri. Ætlað er við eini trygdarmargu á 100 mió. kr. í tøkum peningi umframt nøktandi dráttarrættindum í peningastovnum. Í løtuni hevur SEV tøkar trekningsrættir upp á 270 mió. kr. Tá ið nýggja fíggingin til SEV er endaliga avgreidd, fer SEV við ársenda 2016 at hava eina bruttoskuld uppá 1.000 mió. kr. og trekningsrætt uppá 670 mió. kr. og eitt gjaldføri uppá 343,5 mió. kr.

Peningarenslið frá skuldarum felagsins er umlagt frá januar 2013 at rokna. Nú verður el-rokningin goldin mánaðarliga og ikki sum fyrr við 10 gjøldum. Felagið ger fyri størsta partin av kundunum avrokning umvegis fjarskiftismálararnar, sum eru innlagdir hjá kundunum. Hetta merkir, at rokningin fyri elnýtsluna mánað 1 verður send kundunum í mánaði 2 við eini gjaldsfreist á 10 dagar.

At avrokningin mótvegis kundunum fyri størsta partin av kundunum er umløgd, fer hetta mest sannlíkt at hava við sær, at kundarnir gerast meiri tilvitaðir um sína egnu elnýtslu. Seta teir sær so fyri at spara í elnýtsluni ein mánað, sæst virknaðurin av hesum mánaði aftur á elrokningini hjá kundanum, sum hann fær sendandi.

## 6. Haldførið í fíggjarætlanini 2016-2026

Umráðandi er, at fíggjarætlanin er burðardygg komandi árini, nú ætlanin er at fara undir stóru verkætlanina at víðka Sundsverkið fyri eina upphædd millum 700-800 mió. kr. samstundis, sum felagið eisini ger íløgur á øðrum økjum. Neyðugt verður hjá felagnum at átaka sær skuld fyri at fremja verkætlanirnar.

Ein av grundleggjandi fyritreytunum, sum felagið hevur sett sær fyri at halda í fíggjarætlanini og í stresstestunum, er, at nettoskuldin mótvegis úrslitinum áðrenn avskrivingar og rentur (NIBD/EBITDA) ikki má verða størri enn 6 ferðir í tíðarskeiðnum 2016-2026. Hetta krav avgerð um ella, hvussu nógv ein vegleiðandi broyting í prísinum verður.

Niðurstøðan av hesum er, at sum støðan er í dag við øktari kWt-sølu, lágum oljuprísi og lágari rentu, stórum parti av elframleiðsluni framleiddur við vindi og vatni, verður ikki neyðugt at broyta upp á prísirnar hjá felagnum mótvegis kundunum fyri at røkka málinum um, at úrslitið áðrenn avskrivingar og rentur (NIBD/EBITDA) ikki má verða størri enn 6 ferðir í tíðarskeiðnum 2016-2026.

Hinvegin um afturgongd kemur í kWt-søluna, ella oljuprísurin aftur fer upp, so verður helst neyðugt at gera broytingar í elprísinum mótvegis kundunum, skal felagið fremja ætlaðu víðkanina av Sundsverkinum og aðrar íløgur samstundis sum úrslitið áðrenn avskrivingar og rentur (NIBD/EBITDA) ikki má verða størri enn 6 ferðir í tíðarskeiðnum 2016-2026.

Fyri at meta um haldførið av fíggjarætlanini eru ymiskar "stresstests" gjørdar av fyritreyt-unum í fíggjarætlanini fyri at síggja virknaðin av hesum upp á ymisku lyklatølini.

"Stresstestirnar" eru sum niðanfyri standandi talva vísir.

| Stresstest har alt annað er líkað | Prísbroyting í 2017 |
|---|---|
| 50% afturgongd í søluni av kWt til kundar í alivinnuna | +0,10 kr./kWt |
| 50% afturgongd í søluni av kWt til kundar í pelagisku vinnuna | +0,06 kr./kWt |
| Oljuprísurin fer upp við 300 dollar pr. tons tungolju | +0,17 kr./kWt |
| Rentustøðið hækkar við 4% stig | +0,13 kr./kWt |
| KWt sølan lækkar við 1% stig í øllum kundabólkum 2017-2025 | +0,17 kr./kWt |

Vandin fyri at oljuprísurin fer upp komandi árini, og at rentustøðið hækkar, verður fyri ein part avdekkaður við, at SEV fastlæsir oljuprísin fyri ætlaða oljukeypið fyri eitt longri tíðarskeið, eins og rentan av lánunum verður fastlæst fyri í minsta lagi komandi 5-8 árini.

## 7. Lýsing av búskapinum hjá SEV árini 2008-2026

Talan er um dagføring av brot í notati, sum bleiv sent kommununum í sambandi við eykaaðalfundin tann 30. september 2016.

SEV hevur gjørt stórar íløgur seinastu undanfarnu árini og hevur ætlanir um at fremja stórar íløgur komandi árini. Niðanfyri standandi myndir 1 til 4 vísa gongdina í íløgum felagsins. Eisini eru íløgurnar settar í mun til nettoumsetningin.

*Mynd 1 – Staðfestar íløgur í mió. kr. 2008 til 2015*




*Mynd 2 - Væntaðar íløgur í mió. kr. 2016 - 2026*




Omanfyri standandi myndir 1 og 2 vísa gongdina í staðfestum og væntaðum íløgum yvir eitt longri tíðarskeið. Væntaðu íløgurnar komandi 5 árini eru stórar, tí hevur SEV tørv á einum sterkum búskapi.

Niðanfyri standandi mynd 3, sum er ein sundurgreining av einstøku íløgunum, vísir, at víðkanin av Sundsverkinum er størsta einstaka íløg+an komandi árini. Somuleiðis eru nógvar íløgur í framleiðslueindir, sum framleiða elorku burturúr "grønum" orkukeldum.

Íløgan í netpartin er serliga í koplingarstøðir, net og sjókaðlar. Ein møguligur nýggjur fyrisitingar- og verkstaðarbygningur er útsettur til 2022-2023.

*Mynd 3 – Væntaðar samlaðar íløgur 2016-2026*

| (DKKm) | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| *Sundsverkið* og onnur oljurikin verk | 144 | 487 | 112 | 135 | | | | 50 | 50 | 50 | 100 |
| Vindmyllur | | 50 | | | 24 | 100 | | | | | |
| Vatnorkuverk | 10 | 23 | | | | | | | | | |
| Sjóvarfall/sól | | | | 4 | 50 | 50 | | | | | |
| Pumped storage og/ella vatnorkuverk | | | | | 10 | 30 | 80 | 30 | | | |
| Net | 97 | 168 | 139 | 85 | 58 | 30 | 198 | 80 | 30 | 30 | 30 |
| **Íløgur tilsamans** | **251** | **728** | **251** | **224** | **142** | **210** | **278** | **160** | **80** | **80** | **130** |

*Mynd 4 – Væntaðar íløgur í net 2016-2026*

| Net íløgur (DKKm) | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Koplingarstøðir | 33,6 | 80,1 | 92,2 | 52,0 | 28,0 | | 18,0 | 20,0 | | | |
| Net og sjókaðal | 38,8 | 39,1 | 34,1 | 26,0 | 26,0 | 26,0 | 126,0 | 26,0 | 26,0 | 26,0 | 26,0 |
| Digitalir málarar | 6,4 | 7,1 | 4,1 | 4,1 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Battarískipan | 7,0 | 2,3 | | | | | | | | | |
| Nýggj stýriskipan og onnur verkfrøði | 1,8 | 12,1 | | | | | | | | | |
| Fyrisiting | 9,4 | 27,0 | 9,0 | 3,1 | 3,1 | 3,1 | 53,1 | 33,1 | 3,1 | 3,1 | 3,1 |
| **Net tilsamans** | **97,0** | **167,7** | **139,4** | **85,2** | **58,1** | **30,1** | **198,1** | **80,1** | **30,1** | **30,1** | **30,1** |

Mynd 5 vísir nettoumsetning felagsins frá 2008 til 2015 við staðfestum tølum, eins og mynd 6 vísir væntaða nettoumsetningin frá 2016-2026.

Vøksturin í umsetninginum seinastu árini kemur av príshækkingum og meirsølu av kWt. Príshækkingin í 2011 var 15 oyru pr. kWt, 10 oyru pr. kWt í 2012 og 5 oyru pr. kWt í 2013 fyri vanligar kundar. Fyri "ídnaðarkundarnar" í framleiðslu til útflutnings hækkaði prísurin 6 oyri pr. kWt og 5 oyru pr. kWt afturat vanligu príshækkingini í ávikavist 2013 og 2014. Sølan í 2008-2011 var umleið 255 GWt árliga fyri síðani at hækka til 261 GWt í 2012 og 274 GWt í 2013 og 284 GWt í 2014. Í 2015 er sølan 288 GWt. Sigast kann, at framgongd hevur verið í nettoumsetninginum, og neyðugt verður við einum góðum nettoumsetningi komandi árini.

*Mynd 5 – Nettoumsetningur í mió. kr. og vøkstur herav í % ár til ár*




*Mynd 6 – Nettoumsetningur í mió. kr. og vøkstur herav í % ár til ár.*




*Mynd 7 – EBITDA og EBITDA margin í mun til nettoumsetning 2008-2017*



Mynd 7 vísir gongdina í EBITDA og EBITDA-margin í mun til nettoumsetningin undanfarnu árini. Henda var á einum lágum støði, men er síðani styrkt munandi seinastu árini fyri at verða 221 mió. kr. av einum nettoumsetningi upp á 422 mió. kr. ella 52,5% í 2015. Hetta høga støði er ætlandi at skula halda áfram komandi árini, sum mynd 8 vísir.

*Mynd 8 – EBITDA og EBITDA margin í mun til nettoumsetning 2016-2026*




Eitt av týdningarmiklu lyklatølunum er nettoskuldin í mun til EBITDA. SEV ynskir ikki, at hetta lyklatal skal verða størri enn 6 ferðir. Í verandi lániavtalu við peningastovnarnar kann talið verða upp til 9 ferðir, men SEV metir hetta verða ov høgt, og vil tí stremba eftir í mesta lagi upp til 6 ferðir. At peningastovnarnir loyva upp til 9 ferðir, gevur SEV eina trygdarmargin at arbeiða innanfyri. Niðanfyri standandi mynd 9 vísir gongdina í nettoskuldini í mió. kr. seinastu árini í mun til EBITDA.

*Mynd 9 – Nettoskuld í mun til EBITDA 2008-2017*



Sum mynd 9 vísir, var nettoskuldin í mun til EBITDA í 2010 á einum sera høgum støði fyri síðani at lækka til 2,8 ferðir í 2015, sum er innanfyri ásettu margu upp á 6 ferðir hjá felagnum.

*Mynd 10 – Nettoskuld í mun til EBITDA 2016-2026*




Av mynd 10 framgongur, at nettoskuldin í mun til EBITDA í tíðarskeiðnum ætlandi heldur seg innan fyri ásettu margin upp á 6 ferðir. Henda gongd í nettoskuldini í mun til EBITDA hongur saman við núverandi prísstøði í mun til samlaðu útreiðslurnar og íløgurnar, har SEV ásetur elprísirnar árliga í sambandi við rakstrar-, fíggjar- og íløguætlanina. Samlaða ætlanin verður umrødd við og viðgjørd av myndugleikanum á økinum, sum er ORKA (fyrr Jarðfeingi) sambært galdandi lóggávu.

Í sambandi við rakstrar-, fíggjar og íløguætlanina hjá SEV fyri 2017 umhugsar felagið, sum áður nevnt, at fremja eina príslækking á 0,05 kr. pr. kWt. Fyri at halda seg til ásetta markið upp á 6 ferðir eru neyðugar tillagingar í rakstur og íløgum gjørdar.

Rakstrar-, fíggjar og íløguætlanin hjá SEV fyri 2017 skal viðgerast av leiðslu, nevnd og eigarunum í oktober og november 2016, tá verður endalig støða tikin til ætlanina sum heild, herundir møguligar prísbroytingar.

*Mynd 11 – Javni og eginpeningur í mió. kr. og soliditetur í % 2008-2017*




Gjøgnum øll árini hevur SEV havt ein góðan soliditet (eginpeningur í mun til samlaðu ognirnar) og í 2015 var hesin 53,2%.

*Mynd 12 – Javni og eginpeningur í mió. kr. og soliditetur í % 2016-2026*




Sum mynd 12 vísir er ætlanin, at SEV framhaldandi fer at hava ein sterkan soliditet komandi árini.

**Vindmyllufeløgini hjá SEV**

## 8. Sjálvstøðug partafeløg at reka vindmyllulundirnar

Roknað er við, at tvey sjálvstøðug partafeløg verða stovnað við tí endamáli at eiga og reka vindmyllulundirnar í Neshaga og í Húsahaga. Hetta er samsvarandi eykaaðalfundarsamtyktina frá 19. juni 2015, har samtykt var:

1) uppskot frá nevndini um loyvi og heimild til nevndina at avhenda tær 5 vindmyllurnar í Neshaga (og tað sum hartil hoyrir) til eitt partafelag ella smápartafelag, ið er 100 % átt dótturfelag hjá SEV, og at avgreiða øll viðurskifti í hesum sambandi
2) uppskot frá nevndini um loyvi og heimild til nevndina at avhenda tær 13 vindmyllurnar í Húsahaga (og tað sum hartil hoyrir) til eitt partafelag ella smápartafelag, ið er 100 % átt dótturfelag hjá SEV, og at avgreiða øll viðurskifti í hesum sambandi.

Somuleiðis er heimildin til nevndina endurnýggjað í sambandi við eykaaðalfundin tann 27. november 2015.

Arbeitt hevur verið við hesum málum í eina tíð saman við eigarum felagsins og avvarðandi myndugleikum, og væntandi verður málið avgreitt við árslok 2016 við virknaði frá 1. januar 2016, um SEV fær endaliga loyvi frá myndugleikunum.

### 8.1 Neshagi

Vindmyllulundin í Neshaga var liðug og tikin í nýtslu í november 2012. Sostatt hevur hendan framleitt el til brúkararnar í fýra ár, og royndirnar hava verið góðar. SEV hevur í ætlanini fyri 2017 og fram tikið virknaðin av vindmyllulundini í Neshaga burtur úr fíggjarætlanini soleiðis at skilja, at fíggjarætlanin hjá SEV er ein samtaksætlan innihaldandi móðurfelagið og dóttur-feløgini undir einum.

Talan er um at flyta tær fimm ENERCON myllurnar í Neshaga – ein samlað íløga á 49,1 mió. kr. í 2012, og tað sum hartil hoyrir, herundir avtalur millum aðrar partar viðvíkjandi virkseminum hjá felagnum, skuldarar, goymslur, tøkan pening og ognarar við meira. Partafelagið verður væntandi stovnað við 7 mió. kr. í innskoti sum partapeningur og møguligan ábyrgdarpening - allur frá SEV.

Í ætlanini er fyrilit tikið fyri, at hetta felag verður stovnað at eiga og taka sær av rakstrinum av vindmyllulundini. Hóast kravið hjá myndugleikanum at leggja í dótturfelag bert fevnir um 3 myllur, so verður mett, at tað er skilagott at leggja allar 5 vindmyllurnar í sama felag.

Virknaðurin av hesum er, at tær fimm vindmyllurnar verða seldar einum dótturfelag hjá SEV fyri kostprísin á 49,1 mió. kr. lækkaður við avskrivingum 2012-2015 á umleið 9,8 mió. kr. soleiðis, at prísurin gerst umleið 39,3 mió. kr. Endalig virðisáseting skal gerast av metingar-manni.

Ætlandi verður partafelagið fíggjað umvegis millumrokning við SEV uppá 32,7 mió. kr., eins og ætlandi verða 7 mió. kr. settar í partafelagið sum partapeningur og møguligan ábyrgdarpening frá SEV soleiðis, at partafelagið hevur neyðugan pening at rinda fyri vindmyllurnar, aðrar ognir og skyldur umframt tøkt gjaldføri.

Í fíggjarætlanini er roknað við, at fíggingin verður veitt umvegis SEV sum millumrokning ella dótturfelagslán. Harumframt fer nýggja partafelagið at standa fyri rakstrinum av vindmyllunum, og tí er neyðugt hjá felagnum at hava eina rakstrarætlan at stýra rakstrinum á nøktandi hátt.

Í 2017 er ætlað, at SEV keypir elframleiðslu frá felagnum svarandi til 16 GWt um árið fyri umleið 0,41 kr. pr. kWt. sambært serligari prísavtalu, sum skal góðkennast av myndugleikanum. Hetta svarar til eitt elorkukeyp á umleið 6,6 mió. kr.

Niðanfyri er rakstrarætlan hjá dótturfelagnum lýst í høvuðstølum í t.kr.

| t. kr. | 2016F | 2017Æ | 2018 | 2019 |
|---|---|---|---|---|
| Søla | 6.759 | 6.826 | 6.895 | 6.964 |
| Rakstur og viðlíkahald | 1.969 | 1.988 | 2.008 | 2.028 |
| Fíggjarkostnaður og avskrivingar | 4.322 | 4.245 | 4.165 | 4.083 |
| Úrslit | 384 | 487 | 592 | 699 |

Niðanfyri er fíggjarstøðan hjá dótturfelagnum lýst í høvuðstølum.

| t. kr. | 2016F | 2017Æ | 2018 | 2019 |
|---|---|---|---|---|
| Samlaðar ognir | 40.598 | 38.535 | 36.501 | 34.495 |
| Gjaldføri | 4.569 | 5.781 | 7.022 | 8.292 |
| Millumrokning við SEV primo | 35.129 | 32.654 | 30.105 | 27.479 |
| Millumrokning við SEV ultimo | 32.654 | 30.105 | 27.479 | 24.774 |

## 8.2 Húsahagi

SEV átók sær at uppseta tær 13 vindmyllurnar í Húsahaga fyri síðani at leggja hesar í eitt sjálvstøðugt partafelag, eftir at SEV hevur tryggjað sær, at verkætlanin endaliga er greidd úr hondum. Hendan verkætlan kostaði 104,5 mió.kr.

Hetta merkir, at SEV hevur tikið sær av øllum avtalum, so sum keypsavtalu við ENERCON um vindmyllur eins og avtalum um gerð av vegi og undirstøði. Henda verkætlan er nú liðug, og bleiv yvirtikin av SEV tann 2. oktober 2014.

Tær 13 vindmyllurnar og tað sum hartil hoyrir, herundir avtalur millum aðrar partar viðvíkjandi virkseminum hjá felagnum, skuldarar, goymslur, tøkan pening og ognarar við meira verða væntandi seldar einum dótturfelag hjá SEV fyri kostprís á umleið 95,4 mió. kr. pr. 1. januar 2016.

Ætlandi verður nýggja partafelagið fíggjað við umleið 79,7 mió. kr. umvegis millumrokning við SEV, eins og 20,0 mió. kr. verða settar í sum partapeningur og møguligan ábyrgdarpening av SEV soleiðis, at partafelagið hevur neyðugan pening at rinda fyri vindmyllurnar, aðrar ognir og skyldur umframt tøkt gjaldføri.

Harumframt fer nýggja partafelagið at standa fyri rakstrinum av vindmyllunum, tí er neyðugt hjá felagnum at hava eina rakstrarætlan at stýra rakstrinum á nøktandi hátt.

Niðanfyri er rakstrarætlan hjá dótturfelagnum lýst í høvuðstølum.

| t. kr. | 2016F | 2017Æ | 2018 | 2019 |
|---|---|---|---|---|
| Søla | 13.345 | 13.479 | 13.614 | 13.750 |
| Rakstur og viðlíkahald | 4.544 | 4.589 | 4.635 | 4.682 |
| Fíggjarkostnaður og avskrivingar | 9.225 | 9.069 | 8.907 | 8.741 |
| Úrslit | -424 | -179 | 71 | 327 |

Niðanfyri er fíggjarstøðan hjá dótturfelagnum lýst í høvuðstølum.

| t. kr. | 2016F | 2017Æ | 2018 | 2019 |
|---|---|---|---|---|
| Samlaðar ognir | 93.179 | 87.742 | 82.398 | 77.147 |
| Gjaldføri | 4.659 | 6.063 | 7.560 | 9.150 |
| Millumrokning við SEV primo | 79.715 | 74.611 | 69.353 | 63.938 |
| Millumrokning við SEV ultimo | 74.611 | 69.353 | 63.938 | 58.361 |

Í 2016 er ætlað, at SEV keypir elframleiðslu frá felagnum svarandi til 41,4 GWt um árið fyri umleið 0,326 kr. pr. kWt. sambært serligari prísavtalu, sum skal góðkennast av myndugleikanum. Hetta svarar til eitt elorkukeyp á umleið 13,3 mió. kr.

Elorkukeypið á 41,4 GWt frá dótturfelagnum hevur SEV bundið seg til at keypa, sjálvt um SEV ikki er ført fyri at fáa allan vindin til sættis. Fyri 2017 og frameftir verður roknað við, at næstan allur vindurin fæst til høldar, og allar vindmyllurnar kunnu framleiða fult inn á netið hjá felagnum.

Tað setur hinvegin krøv til netpartin hjá SEV, at vindmyllur eru settar upp. Tí samstundis sum vindmyllurnar eru settar upp, eru gjørdar stórar íløgur í netpartin, sum tyngja kostnaðin.

Samlaður íløgukostnaður fyri verkætlanina undir einum er umleið 180 mió. kr, tá eru koplingarstøðin í Húsahaga og battaridskipanin íroknað. Hesar íløgur skulu avskrivast millum 15 og 35 ár, og fara árligu avskrivingarnar at økjast samsvarandi, men íløgan hevur jaliga ávirkan á raksturin hjá SEV.

Tórshavn, hin 4. november 2016

Elfelagið SEV

**Rakstrartøl og talvur frá síðu 53 og fram**

- **Rakstur**
- **Javni**
- **Gjaldføri**
- **Íløgur**
- **Talvur**

| Rakstur / Operations | 2016 | 2016 | 2016 | | | 2017 | 2018 | 2019 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Ætlan / Budget | Ætlan / Budget Konsern | | Ætlan / Budget | Staðfest og Framroknað / Actual and projected | Ætlan / Budget | Ætlan og framskriving / Budget and projections | Framskriving/projections |
| | íalt / total | íalt / total | **3/4 ár / year** | **4 ársf. Q4** | **íalt / total** | **íalt / total** | **íalt / total** | **Ár / year** |
| **Inntøkur / Revenue** | | | | | | | | |
| kWh-gjald / kWh charges | 397.084.566 | 397.084.566 | 282.022.723 | 113.548.795 | 395.571.518 | 390.038.645 | 403.047.206 | 426.244.573 |
| Fast gjald / Fixed charges | 16.691.600 | 16.691.600 | 12.329.847 | 4.320.713 | 16.650.560 | 16.650.560 | 16.650.560 | 16.650.560 |
| Íbinding / Connection fees | 12.740.000 | 12.740.000 | 4.867.179 | 3.686.655 | 8.553.834 | 14.184.100 | 8.000.000 | 10.000.000 |
| Annað / Other charges | 1.447.865 | 1.447.865 | 2.650.070 | 350.000 | 3.000.070 | 1.000.000 | 1.000.000 | 1.000.000 |
| Keyp av vindorku / Purchase of wind power | -23.245.260 | -2.692.470 | -1.612.897 | -1.072.515 | -2.685.412 | -2.685.412 | -2.685.412 | -2.685.412 |
| **Nettoumsetningur / Net Turnover** | **404.718.771** | **425.271.561** | **300.256.922** | **120.833.649** | **421.090.571** | **419.187.893** | **426.012.354** | **451.209.721** |
| Oljuútreiðslur til egna nýtslu / Cost of oil used in production | **78.567.804** | **78.567.804** | **37.285.111** | **10.764.609** | **48.049.720** | **69.020.162** | **76.774.847** | **97.480.382** |
| Inntøkur frá sølu av olju til triðjamann / Revenue from oil sold to third parties | 852.135 | 852.135 | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** |
| **Tilfar og tænastuveitingar / Materials and services** | **62.841.752** | **68.842.262** | **38.614.460** | **17.927.870** | **56.542.330** | **65.100.140** | **58.296.124** | **58.962.418** |
| Framleiðsluvirkir | 21.269.500 | 27.270.010 | 16.193.330 | 6.454.408 | 22.647.738 | 27.657.109 | 25.458.680 | 25.713.267 |
| Netvirksemi uttan fyrisiting | 15.517.252 | 15.517.252 | 8.778.361 | 2.926.120 | 11.704.482 | 12.388.031 | 12.540.393 | 12.677.230 |
| Fyrisiting | 26.055.000 | 26.055.000 | 13.642.769 | 8.547.342 | 22.190.111 | 25.055.000 | 20.297.050 | 20.571.921 |
| **Bruttovinningur / Gross profit** | **264.161.350** | **278.713.630** | **224.357.351** | **92.141.170** | **316.498.520** | **285.067.591** | **290.941.383** | **294.766.921** |
| **Starvsfólkaútreiðslur - Salaries and wages** | **72.371.678** | **72.371.678** | **49.864.196** | **18.621.399** | **68.485.595** | **67.157.937** | **67.829.517** | **68.348.155** |
| Framleiðsluvirkir | 30.556.501 | 30.556.501 | 24.719.608 | 8.239.869 | 32.959.478 | 28.997.913 | 29.287.892 | 29.580.771 |
| Netvirksemi uttan lønir hjá fyrisiting | 29.945.793 | 29.945.793 | 16.564.149 | 5.521.383 | 22.085.532 | 25.584.384 | 25.840.228 | 26.098.631 |
| Fyrisiting | 11.869.384 | 11.869.384 | 8.580.439 | 4.860.146 | 13.440.585 | 12.575.640 | 12.701.397 | 12.668.753 |
| **Úrslit áðrenn av- og niðurskrivingar / Profit before depreciation, amc** | **191.789.672** | **206.341.952** | **174.493.154** | **73.519.771** | **248.012.925** | **217.909.654** | **223.111.867** | **226.418.766** |
| **Avskrivingar / Depreciation, amortization and impairment** | **90.906.528** | **101.093.146** | **75.700.656** | **27.817.834** | **103.518.490** | **113.229.873** | **119.624.856** | **143.018.085** |
| **Úrslit áðrenn fíggjarpostar og skatt / Profit before financials and tax** | **100.883.144** | **105.248.806** | **98.792.498** | **45.701.937** | **144.494.435** | **104.679.781** | **103.487.011** | **83.400.682** |
| Virðisjavnan av kapitalpørtum / Subsidiary fair value adjustments | 934.090 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Rentuútreiðslur / Interest expenses | 33.263.500 | 33.263.500 | 21.574.903 | 17.107.415 | 38.682.318 | 37.137.500 | 42.187.500 | 43.812.500 |
| Rentuinntøkur / Interest revenue | 3.912.913 | 500.000 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Úrslit áðrenn skatt / Profit before tax** | **72.466.647** | **72.485.306** | **77.217.595** | **28.594.522** | **105.812.118** | **67.542.281** | **61.299.511** | **39.588.182** |
| Skattur / tax | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | |
| **Úrslit eftir skatt / Profit after tax** | **72.466.647** | **72.485.306** | **77.217.595** | **28.594.522** | **105.812.118** | **67.542.281** | **61.299.511** | **39.588.182** |

| JAVNI / PR. 31. DESEMBER / BALANCE PR. 31. DECEMBER | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **AKTIV / ASSETS** | **Íalt** | **Íalt** | **Íalt** | **Íalt** | **Íalt** | **Íalt** | **Íalt** | **Íalt** |
| **Fastar ognir og avskrivingar / Fixed assets and depreciation, amortization and impairment** | | | | | | | | |
| Útvegnarvirði við ársbyrjan / Acquisition value beginning-of-year | 2.239.262.078 | 2.385.452.238 | 2.581.385.794 | 2.806.425.950 | 2.956.350.005 | 3.247.240.388 | 3.491.633.125 | 3.680.640.987 |
| Tilgongd / additions | 146.529.211 | 195.933.556 | 218.404.641 | 149.924.055 | 290.890.383 | 244.392.737 | 189.007.862 | 872.163.000 |
| Frágongd / disposals | 0 | 0 | - | 0 | 0 | - | - | - |
| **Útveganarvirði við ársenda / Acquisition value year-end** | **2.385.791.289** | **2.581.385.794** | **2.799.790.435** | **2.956.350.005** | **3.247.240.388** | **3.491.633.125** | **3.680.640.987** | **4.552.803.987** |
| Avskrivingar við ársbyrjan / Depreciation, amortization and impairment beginning-of-year | 1.239.213.105 | 1.306.650.082 | 1.376.687.168 | 1.460.519.716 | 1.554.106.275 | 1.657.624.765 | 1.770.854.638 | 1.890.479.494 |
| Avskrivingar í árinum / Depreciation, amortisation and impairment over the year | 67.776.029 | 70.037.086 | 77.197.032 | 93.586.559 | 103.518.490 | 113.229.873 | 119.624.856 | 143.018.085 |
| **Avskrivingar við ársenda / Depriceation, amoritzation and impairment year-end** | **1.306.989.134** | **1.376.687.168** | **1.453.884.200** | **1.554.106.275** | **1.657.624.765** | **1.770.854.638** | **1.890.479.494** | **2.033.497.579** |
| **Fastar ognir við ársenda / Fixed assets year-end** | **1.078.802.155** | **1.204.698.626** | **1.345.906.235** | **1.402.243.730** | **1.589.615.623** | **1.720.778.487** | **1.790.161.493** | **2.519.306.408** |
| Íløguarbeiði í gerð / Investment works in progress | 126.410.900 | 85.486.142 | 142.275.019 | 224.431.198 | 184.271.815 | 668.023.080 | 730.423.080 | 82.423.080 |
| **Materiel støðiogn / Tangible fixed assets** | **1.205.213.055** | **1.290.184.768** | **1.488.181.254** | **1.626.674.928** | **1.773.887.438** | **2.388.801.567** | **2.520.584.573** | **2.601.729.488** |
| Kapitalpartar í dótturfeløgum / Investments in subsidiaries | 0 | 0 | - | - | - | - | - | - |
| Kapitalpartar í assosieraðum virkjum / Investments in associates | 2.850.000 | 2.850.000 | 2.850.000 | 2.850.000 | 2.850.000 | 2.850.000 | 2.850.000 | 2.850.000 |
| **Fíggjarlig støðisogn / Financial Assets** | 2.850.000 | 2.850.000 | 2.850.000 | 2.850.000 | 2.850.000 | 2.850.000 | 2.850.000 | 2.850.000 |
| **STØÐISOGN TILSAMANS / Total Assets** | **1.208.063.055** | **1.293.034.768** | **1.491.031.254** | **1.629.524.928** | **1.776.737.438** | **2.391.651.567** | **2.523.434.573** | **2.604.579.488** |
| Olja á goymslu - Oil nventory | 34.231.695 | 41.335.857 | 19.772.904 | 11.744.354 | 20.554.843 | 12.828.532 | 18.251.566 | 27.735.289 |
| Tilfar á goymslu - Materials inventory | 12.404.184 | 14.470.185 | 26.731.277 | 15.293.017 | 15.293.017 | 15.714.369 | 15.714.369 | 15.714.369 |
| Arbeiði í gerð fyri fremmanda rokning / paid for work in progress | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Goymslur tilsamans / Total Inventory** | **46.635.879** | **55.806.042** | **46.504.181** | **27.037.371** | **35.847.860** | **28.542.901** | **33.965.935** | **43.449.658** |
| Vøru- og tænastuáogn (Elskuldarar) / Eletricity debtors | 43.489.996 | 53.644.032 | 68.804.189 | 77.533.673 | 67.781.534 | 60.000.000 | 60.000.000 | 60.000.000 |
| Skuldarar aðrir / Other debtors | -163.942 | 0 | 0 | 0 | 3.330.631 | 3.330.631 | 3.330.631 | 3.330.631 |
| Millumrokning við net / Settlement grid | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Millumrokning við dótturfeløg/ Settlement with subsidiary company's | | | | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Onnur áogn / Other receivables | 14.154.777 | 6.130.183 | 4.239.375 | 4.387.430 | 8.530.000 | 8.530.000 | 8.530.000 | 8.530.000 |
| Tíðavmarkingar /Prepayments and accrued income | 11.436.273 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Skuldarar tilsamans / Total Receivables** | **68.917.104** | **59.774.215** | **73.043.564** | **81.921.103** | **79.642.165** | **71.860.631** | **71.860.631** | **71.860.631** |
| Lánsbrøv / Obligations | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Virðisbrøv tilsamans / Total shares** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** |
| **Tøkur peningur / Cash and cash equivalents** | **87.384.093** | **66.592.930** | **131.459.476** | **221.889.276** | **343.516.093** | **124.116.776** | **148.210.246** | **147.169.790** |
| **OGN Í UMFERÐ TILSAMANS /TOTAL CURRENT ASSETS** | **202.937.076** | **182.173.187** | **251.007.221** | **330.847.750** | **459.006.118** | **224.520.308** | **254.036.813** | **262.480.079** |
| **AKTIV TILSAMANS / TOTAL ASSETS** | **1.411.000.131** | **1.475.207.955** | **1.742.038.475** | **1.960.372.678** | **2.235.743.556** | **2.616.171.875** | **2.777.471.386** | **2.867.059.567** |

| JAVNI PR. 31. DESEMBER / BALANSE PR. 31 DECEMBER | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **PASSIV / LIABILITIES** | **Íalt** | **Íalt** | **Íalt** | **Íalt** | **Íalt** | **Íalt** | **Íalt** | **Íalt** |
| Innskot / Deposits | 4.139.875 | 4.139.875 | 4.139.875 | 4.139.875 | 4.139.875 | 4.139.875 | 4.139.875 | 4.139.875 |
| Kapitalkonto / Capital account | 878.355.072 | 866.085.120 | 877.951.026 | 935.713.841 | 1.038.780.670 | 1.144.592.787 | 1.212.135.068 | 1.273.434.579 |
| Úrslit / Results | -12.269.953 | 11.865.906 | 57.762.816 | 103.066.828 | 105.812.118 | 67.542.281 | 61.299.511 | 39.588.182 |
| **Eginogn tilsamans / Total Equity** | **870.224.994** | **882.090.901** | **939.853.717** | **1.042.920.545** | **1.148.732.662** | **1.216.274.943** | **1.277.574.454** | **1.317.162.636** |
| | | | | | | | | |
| Avsetingar til eftirløn og líknandi skyldur / Provisions for pensions and equivalent liabilities | 20.101.759 | 18.227.175 | 19.366.050 | 18.845.044 | 18.845.044 | 18.845.044 | 18.845.044 | 18.845.044 |
| Avsetingar til útsettan skatt / Provisions for deferred tax | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Aðrar avsetingar / Other Provisions | 1.830.033 | 47.607 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Avsetingar tilsamans / Total Provisions** | **21.931.792** | **18.274.782** | **19.366.050** | **18.845.044** | **18.845.044** | **18.845.044** | **18.845.044** | **18.845.044** |
| | | | | | | | | |
| Skuld til peningastovnar / Bank borrowings | 218.694.261 | 477.899.068 | 683.991.517 | 830.000.000 | 1.000.000.000 | 1.320.000.000 | 1.420.000.000 | 1.470.000.000 |
| **Langfreistað skuld til samans / Total long-term debt** | **218.694.261** | **477.899.068** | **683.991.517** | **830.000.000** | **1.000.000.000** | **1.320.000.000** | **1.420.000.000** | **1.470.000.000** |
| | | | | | | | | |
| Stuttfreistaður partur av langfreistaðari skuld / Current portion of long-term debt | 242.889.126 | 32.355.033 | 7.419.867 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Skuld til peningastovnar / Bank borrowings | 1.495.476 | 1.685.268 | 1.571.685 | 1.589.119 | 1.589.119 | 1.589.119 | 1.589.119 | 1.589.119 |
| Móttikin frammanundangjøld frá kundum (El-ognarar) / Prepayment received from eletricity debtors | 20.940.563 | 20.622.618 | 21.282.389 | 19.481.196 | 19.481.196 | 19.481.196 | 19.481.196 | 19.481.196 |
| Vøru- og tænastuskuld (aðrir ognarar) / Trade creditors | 31.168.735 | 28.081.118 | 51.091.835 | 32.110.734 | 32.110.734 | 24.996.772 | 24.996.772 | 24.996.772 |
| Millumrokning framleiðsla / Balance production | 0 | | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Partafelagsskattur / Corporate tax | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Onnur skuld / Other debt | 2.735.184 | 14.199.166 | 17.461.415 | 15.426.039 | 14.984.800 | 14.984.800 | 14.984.800 | 14.984.800 |
| Tíðaravmarkingar / Prepayments | 920.000 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Stuttfreistað skuld tilsamans / Total short-term debt** | **300.149.084** | **96.943.203** | **98.827.191** | **68.607.088** | **68.165.849** | **61.051.887** | **61.051.887** | **61.051.887** |
| | | | | | | | | |
| **SKULD TILSAMANS / TOTAL DEBTS** | **518.843.345** | **574.842.271** | **782.818.708** | **898.607.088** | **1.068.165.849** | **1.381.051.887** | **1.481.051.887** | **1.531.051.887** |
| | | | | | | | | |
| **PASSIV TILSAMANS / TOTAL LIABILITIES** | **1.411.000.131** | **1.475.207.955** | **1.742.038.475** | **1.960.372.678** | **2.235.743.556** | **2.616.171.875** | **2.777.471.386** | **2.867.059.567** |

| GJALDFØRISYVIRLIT / CASH FLOW STATEMENT | 2013<br>íalt | 2014<br>íalt | 2015<br>íalt | 2016<br>Íalt | 2017<br>íalt | 2018<br>íalt | 2019<br>Íalt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstur / Operations** | | | | | | | |
| **Nettoumsetningur / Net turnover** | **384.625.911** | **410.551.073** | **421.952.498** | **421.090.571** | **419.187.893** | **426.012.354** | **451.209.721** |
| Streymgjald / KWh charges | 362.430.420 | 379.210.190 | 385.049.525 | 395.571.518 | 390.038.645 | 403.047.206 | 426.244.573 |
| Fast gjald / Fixed charges | 16.600.240 | 16.477.262 | 16.428.281 | 16.650.560 | 16.650.560 | 16.650.560 | 16.650.560 |
| Íbindingargjald / Connection fees | 6.947.748 | 14.656.473 | 16.175.093 | 8.553.834 | 14.184.100 | 8.000.000 | 10.000.000 |
| Ómaksgjøld v.m. / Other charges | 1.269.361 | 2.745.236 | 6.701.155 | 3.000.070 | 1.000.000 | 1.000.000 | 1.000.000 |
| Keyp av vindorku / Purchase of wind power | -2.621.858 | -2.538.088 | -2.401.556 | -2.685.412 | -2.685.412 | -2.685.412 | -2.685.412 |
| **Broytiligur kostnaður / Variable costs** | | | | | | | |
| Oljukostnaður / Cost of Oil | **167.934.451** | **141.500.467** | **86.195.931** | **48.049.720** | **69.020.162** | **76.774.847** | **97.480.382** |
| **- Tilfar og tænastur / Materials and services** | **54.071.491** | **49.833.608** | **49.935.709** | **56.542.330** | **65.100.140** | **58.296.124** | **58.962.418** |
| Framleiðsluvirkir / Power plants | 24.068.583 | 21.139.376 | 21.280.390 | 22.647.738 | 27.657.109 | 25.458.680 | 25.713.267 |
| Netvirksemi uttan fyrisiting / Grid less administration | 15.425.724 | 11.870.060 | 11.815.439 | 11.704.482 | 12.388.031 | 12.540.393 | 12.677.230 |
| Fyrisiting / Administration | 14.577.184 | 16.824.172 | 16.839.880 | 22.190.111 | 25.055.000 | 20.297.050 | 20.571.921 |
| **Bruttovinningur / Gross Profits** | **162.619.969** | **219.216.998** | **285.820.857** | **316.498.520** | **285.067.591** | **290.941.383** | **294.766.921** |
| **- Lønarútreiðslur / Wages and salaries** | **58.705.952** | **63.644.385** | **64.337.566** | **68.485.595** | **67.157.937** | **67.829.517** | **68.348.155** |
| Framleiðsluvirkir / Power plants | 30.652.203 | 30.880.621 | 32.021.973 | 32.959.478 | 28.997.913 | 29.287.892 | 29.580.771 |
| Netvirksemi uttan fyrisiting / Grid less administration | 19.452.583 | 19.876.442 | 21.109.783 | 22.085.532 | 25.584.384 | 25.840.228 | 26.098.631 |
| Fyrisiting / Administration | 8.601.166 | 12.887.322 | 11.205.810 | 13.440.585 | 12.575.640 | 12.701.397 | 12.668.753 |
| **Gjaldførisbroyting frá vanligum raksturi / Changes in cash flow from traditional operations** | **103.914.017** | **155.572.613** | **221.483.291** | **248.012.925** | **217.909.654** | **223.111.867** | **226.418.766** |
| Broytingar í goymslu, skuldarum og ognarum v.m. / Changes in inventory, debtors and creditors etc. | **3.454.142** | **24.056.513** | **-12.749.404** | **-6.972.790** | **7.972.531** | **-5.423.035** | **-9.483.723** |
| +/- broyting í vørugoymslu / changes in inventory | -9.170.163 | 9.301.910 | 19.466.811 | -8.810.489 | 7.304.959 | -5.423.035 | -9.483.723 |
| +/- broyting í skuldarum / changes in debtors | 9.142.889 | -13.269.349 | -8.877.540 | 2.278.938 | 7.781.534 | 0 | 0 |
| +/- broyting í avsetingum/skyldum / changes in provisions | -4.930.967 | 1.091.268 | 521.006 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| +/- broyting ognarum/changes in creditors | | 11.510.717 | -18.981.101 | 0 | 0 | 0 | 0 |
